Nr. 7 • oktober 2010

# MIÐ & MAGN



Føroya Skipara- og Navigatørfelag & Maskinmeistarafelagið

**ÚTGEVARI**
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

**BLAÐNEVND**
Eyðstein Djurhuus (ábyrgd).
Regin Nónstein.
Páll Hansen.
Jóan Petur Patursson.

**MASKINMEISTARAFELAGIÐ**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG**
Jekaragøta 10
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon: 31 69 73
Teldupostur: fsn@fsn.fo

**BLAÐHALD**
Tey, sum ynskja at halda MIÐ & MAGN kunnu boða frá hesum í teldupost til:
bladhald@midogmagn.fo
Haldara gjaldið er 200,- kr.
um árið; t.v.s. 4 bløð.

**ENDURGEVING**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst.
MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo

**UMSITING**
Sp/fMEDIA
info@midogmagn.fo

**UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Føroyaprent | www.foroyaprent.fo

UPPLAG: 1900




# Kinesarar í føroyskum makrel fiskiskapi

Skipini Athena og Poseidon hava í summar tikið ímóti makreli frá ísfiskatrolarum. Eisini hava tey avreitt til Næraberg og Kollafjørð Pelagic. Hetta er uttan iva eitt gott íkast hjá hesum skipum. Vit fegnast um, at væl hevur gingist við hesum royndum. Hetta kann bert bøta um okkara samráðingar støðu, nú makrelsamráðingar verða aftur.

Vit hava ongantíð mótmælt, tá útlendsk móðurskip hava tikið ímóti fiski frá føroyskum skipum. Hetta hevur økt um eftirspurningin og hækkað fiskaprísin. Feløgini taka undir við, at so nógvir keyparar sum møguligt kunnu bjóða uppá fiskin.

Nú eru fleiri milliónir tons av makreli komin inn á okkara landgrunn, at eta seg feitan. Føðigrundarlagið undir øðrum fiskastovnum, kann skjótt koma í vanda. Tí er tað væl grundað, tá feskfiskaskipini eisini fáa part av øktu makrelkvotuni.

Tað undrar okkum stórliga at skip, sum higartil hava fiskað í Kyrrahavinum, skulu fáa loyvi at veiða makrel undir Føroyum. Allir skipabólkar hava mist annað hvørt kvotur ella fiskidagar. Skip eru seld av landinum fyri at fáa veiðirættindi, at samsvara við skipatalið. Manningar hava soleiðis mist síni størv í hesi tillaging av flotanum.

Abeiðs-og uppihaldsloyvi hevur higartil verið kravt til allar útlendskar sjómenn við føroyskum fiskiskipum. Hetta hevur verið galdandi, tá skip royna í føroyskum sjógvi, og skipið kemur í føroyska havn. Av einari ella aðrari óforkláriligar orsøk, er løgreglan og donsku útlendinga myndugleikarnir komnir fram til, at aðrar reglar skulu galda fyri Athenu og Poseidon.

Dømi eru um at skiparar eru revsaðir tí teir hava mynstrað útlendingar, sum ikki hava hesi loyvi. Vit óttast fyri, at nú kemur ólag í alla hesa skipan. Tað er sera átaluvert, tá somu reglar ikki galda fyri øll í okkara samfelag.

Verandi skipan við føroyskum sáttmálum kann koma undir stórt trýst, tá skip sum royna í sama fiskarí, eru undir heilt ymiskum treytum. Innlendismálaráðharrin, Annika Olsen hevur tosa við vinnuumboð, um neyðugar broytingar í útlendingakunngerðini. Manningarfeløgin mæltu til, at kunngerðin má gerast nógv greiðari, so eingin ivi kann setast við, nær arbeiðsloyvi krevst.

*Vegna Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið*

*Eyðstein Djurhuus ábyrgdarblaðstjóri*

# Innihaldsyvirlit





„The Pelagic Complex“ . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 4
– Uppsjóvarheildin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 4
Makrelurin hóttir neyvan tosk og upsa. . . . . . . . 8
Eisini eginkvota næsta ár. . . . . . . . . . . . . . . . . . 12
Vit mugu taka fleiri faktorar inn í myndina. . . . . 14
Kostnaðarmikið at fiska makrel. . . . . . . . . . . . . . . . 16
Tá ið arbeiðið kemur í tvídrátt við samdøgursrytmuna 18
Eftirlønir á vegamóti. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 20
Sundsverkið fingið ISO 14001 góðkenning . . . . . . . 22
Klakkur og Jákup B. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 24
Vitjan fyri innbodnum umborð á Athenu. . . . . . . . . 26
Mangir sigldu við Brandi Sigmundarsyni . . . . . . . . . 28
Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum . . . . . . . . . . . 31
Tíðindi frá Føroya Skipara- og Navigatørfelag . . . . . 32
19 maskinistar prógv á Vinnuháskúlanum. . . . . . . . 35
Navigatørurin í brennideplinum: . . . . . . . . . . . . . . 37
Á fakfelagsskeið við Norrønu . . . . . . . . . . . . . . . . . 38
Faroese Maritime Unions stovnað. . . . . . . . . . . . . . 39










# „The Pelagic Complex“

## Stórfingin ráðstevna 7. – 9. september:

# – Uppsjóvarheildin



Kjartan Hoydal

*Tekstur: Kjartan Hoydal*

Ráðstevnan um uppsjóvarfiskiskap í landnyrðingspartinum av Atlantshavi, sum hevur so stóran búskaparligan týdning, fekk tíverri mótrák av tí stríðið, sum er komið í , um hvussu makrelurin skal býtast millum lond. Summi lond noktaðu at senda umboð til stevnuna, frøðingar, fiskimenn og myndugleikaumboð.

Hetta var ikki serliga væl umhugsað. Hetta var ikki ein stevna sum skuldi fremja áhugamál hjá einstøkum londum, men ein stevna sum skuldi varpa ljós á teir ferðandi fiskastovnar, sum hava so stóran týdning fyri øll lond í landnyrðingspartinum av Atlantshavi.

Føroyska fiskimálaráðið skipaði fyri stevnuni. Hetta er partur av formansskapinum fyri norðurlanda fiskivinnusamstarvinum undir Norðurlanda Ráðharraráðnum.

Stutt er at siga, at stevnan var sera væl fyriskipað og lýsti at kalla alt, sum hevur við uppsjóvarveiðuna at gera.

1. Hav- og lívfrøðina
2. Tøkni
3. Fíggjarliga og sosiala týdningin
4. Spurningin um, hvussu vit skulu býta fiskastovnar, sum ganga um ymiskar landleiðir og út í altjóða sjógv

Landingar frá hesum stovnum hava í fleiri ár verið oman fyri 3 milliónir tons. Allir ferðast til og ígjøgnum føroyskt sjóøki, Norðurhavið, sum er týðandi mið at leita sær føði.

**Dømi:**
**Veiðan eftir uppsjóvarfiski hjá øllum londum í 2007.**
1000 tons. **Virði uml. 3,9 milliardir krónur**

| Stovnur | Landingar úr altjóða sjógvi | Allar landingar |
|---|---|---|
| Norðurhavssild | 168 | 1243 |
| Svartkjaftur | 302 | 1583 |
| Makrelur | 27 | 461 |
| Til samans | 497 | 3287 |

### Hav og lívfrøðin

Frá 1995 til 2004 var tilgongdin í øllum trimum uppsjóvarstovnum óvanliga stór. Mett verður at stovnsvektin fyri hesar tríggjar stovnar fór upp um 25 milliónir tons. Hetta ávirkaði nøgdina av æti – tað var ovbeitt – og føðinøgdin minkaði munandi. Hetta kann hava ávirkað vøkstur og tilgongd seinastu árini. Minkandi nøgdin av æti kann eisini hava við sær broytingar í havstreymunum. Tilfar var lagt fram, sum vísti hvussu stovnarnir hava broytt gongd gjøgnum árini. Vit hava sostatt søguligt tilfar, men tá tað kemur til at meta um hvat hendir komandi árini eru vit verri fyri. Hetta varð samanfatað av Boga Hansen í fyrilestri um, hvussu veðurlagsbroytingar kunnu ávirka sjógvin um okkara leiðir: „*Um vit samanfata alisfrøðiligu og lívfrøðiligu viðurskiftini í landnyrðingspartinum og norðurlanda partinum av Atlantshavi so bendir alt á, at tey fara at broytast, men hvussu nógv og hvønn vegin er ringt at meta um nú.*“

Tøkniligar avbjóðingar at bøta um búskapin í uppsjóvarvinnuni – hvussu økja vit um virðið og lække útreiðslurnar

Fyrilestrar vóru og orðaskifti var um skip og reiðskap og um, hvussu rávøran skal handfarast. Eisini um hvussu nógv orka verður nýtt til at veiða uppsjóvarfisk (carbon footprint) og hvussu burðardygt tað er yvirhøvur at nýta fisk til annað enn mannaføði.

### Búskapurin

Til hesa ráðstevnu hevði Norðurlanda Ráðharraráðið latið gera eina frágreiðing „Samfundsøkonomisk afkast af pelagiske fiskerier i nordøstatlanten“. Hon varð greinliga løgd fram á stevnuni.

Altjóða áhugi er fyri, hvussu væl fiskiskapur verður rikin. Eru umsiting og rakstur í lagi eigur fiskiveiðan at geva eina tilfeingisrentu. Tilfeingis-



Áhoyrarar




Poul Degnbøl



Bergur Poulsen og Kaj Mortensen



Íslendski forsætisráðharrin Jóhanna Sigurðardóttir virjaði ráðstevnuna í Norðurlandahúsinum





Ragnvald Hannesson og Hans Ellefsen



*Janet S. Nørregaard og Andras Kristiansen*



*Tórheðin Jensen og Durita í Grótunum*

rentan verður gjørd upp við at sammeta roknskapir fyri fiskiskip við roknskapir í øðrum vinnum. Samfelagsbúskaparliga úrslitið er tað, sum er eftir tá kapitalur og manningar hava fingið sítt, út yvir tað sum fæst í øðrum vinnuligum virksemi. Í miðal er samfelagsbúskaparliga úrslitið 32 % fyri øll londini (Russland ikki íroknað), mest í Íslandi og minst í Danmark. Føroyar er næstovasta land við 38 %.

Tvey úrslit vóru roknaði út, sí tabel niðanfyri:

1. Úrslit uttan at draga tað sum hitt almenna letur til fiskivinnuna verður drigið frá (t.d. umsiting, vaktarhald, studningur v.m.) Samfundøkonomisk afkast A.
2. Úrslit har tað sum hitt almenna letur til fiskivinnuna verður drigið frá (t.d. umsiting, vaktarhald, studningur v.m.) er drigið frá. Samfundøkonomisk afkast B.

Hetta vísir at uppsjóvarfiskiskapurin um okkara leiðir er rikin væl og væl umsitin og fær tað mesta av tilfeingisrentuni til høldar. Úrslitið kann sammetast við tað úrslit Heimsbankin í fjør kom fram til. Úrslitið hjá heimsbankanum var, at altjóða fiskivinnan hevur eitt samfelagsligt undirskot upp á helvtina av landingarvirðinum. T.e. minus 50 %. Hetta er líka ringt sum úrslitið í ringastu studningtíðini í Føroyum seinast í áttatiárunum og fyrst í nítiárunum.

## Hvussu skulu vit býta felags stovnar?

Í fleiri fyrilestrum var víst á, at ongar altjóðareglur eru fyri, hvussu vit býta ferðandi fiskatovnar. Í altjóðarætti eru hópin av ásetingum um, hvussu vit skulu fara við livandi tilfeingi, serliga fiskastovnum. Hetta sæst aftur í t.d. Lóg um Vinnuligan Fiskiskap í Føroyum. Tá tað kemur til at býta eru ávísar ábendingar, men einki fast at halda um.

Hjalti í Jákupsstovu legði fram nakrar tankar frá einum føroyskum bólki hvat átti at verið lagt til grund og legði serliga dent á dygga vitan um, hvussu stovnarnir ferðast og hvar teir vera veiddir.

Nógv var tosað um makrelósemjuna. Vert er tó at geva gætur at londini í landnyrðingspartinum av Atlantshavi fyrr hava verið før fyri semjast um býti. Í 1994 og 2006 um norðurhavssildina, í 2006 um svartkjaft, so vónir eru fyri at tað eisini ber til at finna eina semju um makrelin. Ein trupulleiki er tó, at tað ikki hevur verið hugt at grundarlagnum fyri býtinum síðan 1977. ICES gjørdi tá eina kanning, sum vísti hvussu makrelurin ferðaðist og var veiddur. Henda kanning er enn í høvuðsheitum grundarlagið fyri býtinum, hóast støðan í makrelfiskiskapi er heilt øðrvísi nú. Tá var høvuðsstovnurin og -veiðan í Norðsjónum meðan vestanmakrelurin hevði lítlan týdning. Í dag er Norðsjóvarmakrelurin at kalla burturur og vestanmakrelurin ferðast meira norðureftir.

Fyrilestrar og samandráttir, (á enskum), eru tøkir á heimasíðuni www.pelagiccomplex.com

Meira fæst eisini at vita á heimasíðu NEAFCs www.neafc.org

| | Ísland | Noreg | Føroyar | Danmark | Stórabretl. | Til samans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Samfundsøkonomisk afkast (type A) milliónir kr. | 530 | 559 | 213 | 121 | 456 | 1879 |
| **% av landingarvirði** | 43 | 28 | 38 | 16 | 32 | |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Offentlige nettoudgifter:* | | | | | | |
| Tilskud | 0 | -2 | -6 | -12 | -2 | -22 |
| Fiskeriforvaltningsomkostninger | -24 | -115 | -26 | -48 | -83 | -296 |
| Brugerbetaling for forvaltning og kontrol | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 | 2 |
| Total | -23 | -116 | -32 | -60 | -85 | -316 |
| - pct. af fangstværdi | 2 % | 6 % | 6 % | 8 % | 6 % | 5 % |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Samfundsøkonomisk afkast (type B) milliónir kr. | 507 | 446 | 181 | 60 | 371 | 1565 |
| **% av landingarvirði** | 41 | 22 | 32 | 8 | 26 | 26 |



*Thorbjørn Trondsen*



*Jón Rasmussen og Lion Petersen*



*Eskild Kirkegaard og Poul Degnbøl*

**Býtið millum strandalond í 2009 Makrelur, svartkjaft og sild.**
Úr framløgu hjá Hjalti í Jákupsstovu, Hans Ellefsen and Kate Sanderson.

| | EU | NO | IS | FO | RU | Weight |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Mackerel | 60% | 35% | 0% | 5% | 0% | 1 |
| **Blue Whithing** | 31% | 26% | 18% | 26% | 0% | 1 |
| **NSS Herring** | 7% | 61% | 15% | 5% | 12% | 1 |

# Makrelurin hóttir neyvan tosk og upsa



*Jan Arge Jacobsen, fiskifrøðingur*

**Stóru nøgdirnar av makreli undir Føroyum seinastu tíðina eru neyvan nøkur hóttan fyri fiskasløg sum tosk ella upsa, soleiðis sum onkur vil vera við, heldur Jan Arge Jacobsen, fiskifrøðingur. Hann vísir á, at hóast nógvur makrelur í fjør var undir Føroyum, var eisini nógv toska- og nebbasildayngul til. Tí munnu tað vera aðrar orsøkir enn makrelurin, sum gera, at tað í ár er minni av toskayngli, enn eitt nú í fjør**

*Tekstur: Edvard Joensen*

Tað er einki, sum bendir á, at makrelurin, sum er undir Føroyum, hóttir fiskasløg sum tosk, upsa og nebbasild, sum onkur er farin at rógva fram undir, sigur Jan Arge Jacobsen, fiskifrøðingur á Havstovuni.

Jan Arge Jacobsen hevur ábyrgd av kanningum av uppsjóvarfiskasløgunum, sild, svartkjafti og makreli, undir Føroyum, og hann er í skrivandi stund við at leggja seinastu hond á tilmælini, sum Havstovan fer at koma við um fiskiskap komandi ár.

–Hóast onkur heldur, at tað er makrelurin, sum er orsøk til at so lítið er til av toskayngli í ár, er ikki vísindaligt grundarlag fyri at halda so, sigur hann. Heilt einfalt tí eingin kanning er gjørd av, hvat makrelurin, sum ferðast inni á føroyska landgrunninum, etur.

Hann sigur, at ætlanin er at søkja um pening til eina verkætlan at gera kanningar av magainnihaldi í makrelinum komandi ár. Ætlandi við stuðli frá nótaskipum, feskfiskatrolarum og eisini við havrannsóknarskipinum Magnusi Heinason.

## Gýtir í føroyskum sjógvi

Kanningar hava verið gjørdar í ár, sum vísa, at makrelurin gýtir rímiliga víða í føroyskum sjógvi. Hetta hevur ikki verið ávíst fyrr, men nú er staðfest, at makrelur gýtir í føroyskum sjógvi. Tó er Føroyaleiðin ikki høvuðsgýtingarøkið hjá makreli, vísir Jan Arge Jacobsen á. Tað er framvegis vestan fyri Írland, og hóast nógvur makrelur er í føroyskum øki og gýtir, er gýtingin á vanligu leiðini vestan fyri Írland ikki minkað.

– Vit vita ikki rættiliga, um makrelurin sum heild er fluttur inn í føroyskan sjógv, ella um tað bara er tað, at so nógv er til, sum ger, at hann er at fáa á so stórum øki her á okkara leiðum, sigur fiskifrøðingurin. Men tað er minni til í norskum sjógvi, vísir hann á, og tann makrelurin, sum er eystari á, er smærri enn tann, sum ferðast norður vestureftir fram við Føroyum.

Hann sigur, at tað vísir seg, at tann makrelurin, sum ferðast longst burtur frá vanligu leiðunum sunnan fyri okkum at leita sær føði, er tann størsti makrelurin.

*Makrelútbreiðsla 2010*



*Mackerel trawl catches (kg/nm) July/August 2010*



*Øll sløg 2010*



Hetta kemst av, at tann størri makrelurin kemur skjótari fram við einum ávísum títtleika í sløgum við sporlinum, enn tann minni fiskurin.

Tað er tó ikki bara her á Føroyaleiðini, at makrelur er komin seinnu tíðina. Hann er eisini fingin runt alt Ísland, og so langt norður sum uppi móti Svalbard, hevur makrelur eisini verið í ár.

## Saman við sildini

Makrelurin ferðast meira saman við sildini, enn við øðrum fiskasløgum. Tað hevur verið frammi, at svartkjaftastovnurin er so illa fyri, tí at tað er so nógvur makrelur, sum etur føðina undan svartkjaftinum.

Men tað heldur Jan Arge Jacobsen ikki vera rætt. Í fyrsta lagi, tí svartkjaftur og makrelur ikki ganga í sama dýpi. Svartkjafturin gongur djúpari, enn makrelurin ger. Í øðrum lagi eta teir ikki somu føði. Svartkjafturin tekur mest krill. Makrelurin etur í høvuðsheitinum reyðæti. Eisini hava fiskastovnar tað fyri at vaksa og minka. Svartkjafturin menti seg miðskeiðis í nítiárunum og er nú minkaður aftur. Tað kann vera bæði av natúrligum orsøkum, við versnandi tilgongd



*Makrelútbreiðsla 2005 og áðrenn 2005*



*Makrelútbreiðsla 2007*



*Makrelútbreiðsla 2009 og 2010*







og eisini við hjálp frá fiskiskapinum, sum var hægri enn mælt varð til av ICES seinastu árini, heldur Jan Arge Jacobsen .

Hetta hava vit sæð við sildini fyrr, og tað man helst eisini fara at verða so við makrelinum, at hann fer at rýma aftur hiðani um eina tíð, heldur fiskifrøðingurin.

Vanligt er hjá stóru uppsjóvarskipunum, at tey fáa makrel og sild um somu leiðir. Hetta kemst av, at sild og makrelur liva av somu føði, greiðir fiskifrøðingurin frá. Men okkurt bendir á, at makrelurin er sterkari ella í hvussu er stinnari til at veiða sær føðina, tí sildin er verri fyri, enn makrelurin er. Eisini sær út til, at sildin noyðist at leita sær aðrar leiðir eftir føði, tí hon er at fáa í útjaðaranum av teimum økjum norðanfyri, har makrelurin ferðast. Tað er minni bland millum sild og makrel í ár, enn tað var í fjør, tí sildin tykist kroyst vestureftir. Men hví tað man vera, vita fiskifrøðingarnir ikki at siga við vissu.

–Eitt boð kann vera, heldur Jan Arge Jacobsen, at sildin gýtir fyrr enn makrelurin, og tá hon er liðug at gýta við norsku strondina, fer hon vestur í hav at søkja sær føði, meðan makrelurin so ger burtur av sær sunnanfyri. Fyrr, tá minni var til av makreli, ið leitaði sær føði norðanfyri um summarið, hevði sildin betri rásarúm í norðurhøvum.

## Føði og útbreiðsla

Makrelurin etur reyðæti, greiðir Jan Arge Jacobsen, fiskifrøðingur frá. Eisini vita vit, at har hann kemur fram at til dømis smáu nebbasildini, verður hon ein partur av føðini. Men enn kunnu vit ikki svara spurninginum, um makrelurin etur toskayngul ella annan yngul og soleiðis er orsøk til, at hesir stovnarnir minka.

Makrelur og sild eta somu føði, sigur hann. Men ikki tað sama, sum svartkjafturin etur.

Vit vita ov lítið um makrelin til at kunna siga nakað neyvt um hann og hansara matvanar, sigur Jan Arge Jacobsen. Nakrar kanningar eru gjørdar av magainnihaldinum, men tær vórðu gjørdar á víðum havi í samstarvi við íslendingar og norðmenn. Inni á føroyska landgrunninumeru bert einstakar slíkar kanningar gjørdar, og eisini hesar benda á, at reyðæti er høvuðsføðin.

Havstovan hevur tó ætlanir um at sleppa at gera slíkar kanningar komandi ár, men tað veldst sjálvandi nógv um fígging til slíka verkætlan.

Makrelurin er ein heldur loyndarfullur fiskur, um so kann sigast. Vit vita ov lítið um hann enn til at kunna siga nakað neyvt um støddina hjá stovninum. Stovnsmetingar verða gjørdar á hvørjum ári, men einki nágreiniligt mát er fyri støddini, uttan tær rognteljingar, sum hava verið gjørdar triðja hvørt ár.

Vanliga verður ekkólodd nýtt sum amboð í stovnsmetingunum av uppsjóvarfiski hjá fiskifrøðingunum. Men ekkólodd kann ikki nýtast til makrel, tí hann sæst rætt og slætt ikki á ekkóloddi, av teirri orsøk, at hann hevur ongan sundmaga. Tað er nevniliga luftin í sundmaganum, sum gevur ekkó. Tí eru rognteljingarnar einastu metingarnar av stovninum, ið eru til í løtuni.

Vit vita tó, at makrelur hevur verið undir Føroyum í longri tíð. Russar byrjaðu longu í áttatiárunum at fiska makrel sum hjáveiðu. Hendan hjáveiðan vaks, sum árini gingu, og tað gjørdi so aftur, at føroyingar fingu makrelkvotu, og Føroyar gjørdist strandarland.

# Eisini eginkvota næsta ár


*Jákup Vestergaard hevur góð kort í skjáttuni, men kortini væntar hann tórførar samráðingar*

**Jacob Vestergaard væntar torførar samráðingar um makrelin seinni í mánaðinum, men eydnast ikki at finna semju, fer hann aftur at áseta føroyingum eginkvotu næsta ár**

– Eydnast tað ikki at finna eina semju um makrelin, verður tað natúrliga úrslitið av tí, at vit eisini áseta okkum eina eginkvotu næsta ár.

Tað staðfestir Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum nú beint uppundir samráðingarnar um makrelin.

Hvussu stór ein møgulig eginkvota verður, hevur hann ikki gjørt sær tankar um enn.

Hinvegin leggur hann afturat, at stovnurin er væl fyri, og tilráðingin frá ICES er, at næsta ár kunnu 672.000 tons fiskast av makreli, afturímóti 572.000 tonsum í ár.

Men tað skilst eisini á honum, at hann ger sær ikki stórvegis vónir um at finna eina semju.

– Eg vænti torførar samráðingar, tí eftir sum tað ljóðar bæði úr ES og úr Noregi, halda tey fast um sína støðu, sigur hann.

Annars fer Fiskimálaráðið nú at fyrireika seg til samráðingarnar, og í hesum sambandi eru eisini fundir við vinnuna.

Men tá ið farið verður til samráðingar, hevur Jacob Vestergaard kortini ta staðfesting við afturat í skjáttini, at tað gekk reiðiliga skjótt at fiska eginkvotuna upp á 100.000 tons í ár, hóast fiskiskapurin byrjaði seint.

Og um so skuldi verið, kundu vit havt fiskað nógv meiri, enn vit gjørdu, tí tað var rættiliga nógvur makrelur undir Føroyum.

– Vit vita eisini, at øll tann føroyska makrelveiðan hevði kunnað brúkst til matna.

Somuleiðis hava vit fingið staðfest í kanningum saman við íslendingum og norðmonnum, at stórar nøgdir av makreli eru undir Føroyum og harafturat, at hann eisini gýtur her hjá okkum.

Hinvegin er okkara sjóøki rættiliga nógv minni enn norskt og íslendskt sjóøki.

– Men okkara páhald er kortini tað, at tað er rættiliga nógvur makrelur í føroyskum sjógvi.

### Geva seg neyvan

Hann sigur, at útsøgnirnar, sum eru komnar úr ES og úr Noregi benda á, at tey ætla ikki at geva seg mótvegis føroysku krøvunum, og tí er hann meiri ivingarsamur um úrslitið av samráðingunum.

Hinvegin hava myndugleika-persónar í ES róð framundir, at treiska støðan hjá føroyingum kann fáa avleiðingar fyri annað fiskiveiðisamstarv í millum Føroya og ES.

Men tí stúrir Jacob Vestergaard ikki fyri.

– Vit hava samstarv við ES um aðra uppsjóvarvinnu, men tað liggur í eini fastari legu við tað, at semja er um býtið, og eg vænti ikki, at tað verður nervað av makrelstríðnum.

Um tað fer at órógva ”vanligu“ fiskiveiðiavtaluna við ES, dugir hann ikki at siga, hóast talsfólk hjá ES hava róð framundir, at tað fer at henda

Kortini heldur hann ikki, at ”vanliga“ fiskiveiðiavtalan við ES hevur so stóran týdning, at tað er nøkur orsøk at rystast í brókunum av teirri orsøk.

– Sjálvandi hevur hon týdning, og sjálvandi fær tað avleiðingar, skuldi hon dottið niðurfyri. Men fiskiveiðiavtalan er ikki so stór í vavi og harafturat, so betala føroyingar fyri hvønn stert, teir fáa frá ES.

– Tað er ein handilsavtala, har vit betala fyri tað, vit fáa.

Tí metir landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, at skuldi avtalan við ES dottið niðurfyri, verður skaðin avmarkaður.

Men annars væntar hann ikki, at ES fer at draga hesa avtaluna upp í makrelmálið, hóast talsfólk fyri ES hava hótt við tí.



Hann væntar heldur ikki, at hetta fer at fáa avleiðingar fyri avtaluna við norðmenn, men eisini í tí føri, betala vit fyri tað, vit fáa.

– Vit hava ongar ábendingar fingið um, at hetta fer at fáa avleiðingar fyri avtaluna við norðmenn.

### Gransking styrkjast

Men eitt er landsstýrismaðurin kortini sannførdur um, og tað er, at hvat gransking viðvíkur, standa vit nakað veik.

Tí fer hann at taka stig til at styrkja granskingarpartin av virkseminum á Havstovuni.

Hann sigur, at seinastu tvey árini eru kanningar gjørdar, men tær vildu ES ikki vera við í.

– Teir halda seg helst standa í eini so mikið sterkari støðu, at teir eru ikki sinnaðir at vera við í meiri gransking, tí vandi er fyri, at tað fer at gera teirra støðu veikari.

Landsstýrismaðurin harmast um, at tað ikki hevur eydnast at finna eina felags gransking, tí nú verður granskað hvør sær, har hvørt landið sær roynir at styrkja sína egnu støðu.

– Og tað fara vit í Føroyum eisini at gera, sigur Jacob Vestergaard.

# Vit mugu taka fleiri faktorar inn í myndina

**Tá ið samráðingar aftur verða um makrelin, má tað vera á einum breiðari grundarlagi enn bara søguligum fiskiskapi og fiskiskapinum nú, heldur Hjalti í Jákupstovu, fiskifrøðingur**

– Fyrr ella seinni skal semja gerast um makrelin.

Og tað er bara ein vegur at fara og tað er at samráðast og at samráðast enn meiri, til ein semja er funnin.

Tað heldur Hjalti í Jákupsstovu, fiskifrøðingur.

Hann er fyrrverandi stjóri á Fiskirannsóknarstovuni, og hann var eisini formaður í nevndini, ið fyrireikaði ráðstevnuna um uppsjóvarfisk, sum var í Norðurlandahúsinum herfyri.

Hann sigur, at fyrr ella seinni mugu londini koma til eina semju, sum avmarkar veiðina á einum støði, har hon er burðardygg.

Men hann staðfestir eisini, at tað er onki nýtt, at londini eru ósamd um býtið.

Norðmenn og ES myndugleikar hava verið í øðini inn á føroyingar, tí at vit ásettu okkum eginkvotu, og har er semja um, at hetta skal koma okkum aftur um brekkur.

Men um tað var rætt ella skeivt av føroyingum at áseta sær eina eginkvotu, vil Hjalti í Jákupsstovu ikki siga nakað um.

– Eg kann bara staðfesta, at tað er eitt jarnbrot, sum føroyingar hava. At áseta eina eginkvotu er ikki ein vísindalig avgerð, men ein politisk avgerð, sum eg ikki havi nakra meining um sum vísindamaður.

Av tí sama hevur hann heldur onga meining um reaktiónina úr hinum londunum til føroysku avgerðina.

### Breiðari grundarlag

Men hann heldur, at tá ið semja skal finnast um makrelin, er neyðugt at hyggja at fleiri faktorum enn bara søguligum fiskiskapi.

Sostatt heldur hann ikki, at tað ber til, bara at tvíhalda um, at søguligur



*Tað er bara ein vegur og tað er at samráðast-og at blíva við at samráðast, sigur Hjalti í Jákupsstovu*

fiskiskapur skal hava so avgerðand týdning.

Tá ið semja varð gjørd á sinni fyri næstan 20 árum síðani, var makrelstovnurin í Norðsjónum tann størsti stovnurin, og tann minni parturin av makrelinum var vestan fyri.

Tí gav tann semjan norðmonnum ein størri part av makrelinum í Norðsjónum, og hini fingu so afturfyri tann størra partin av makrelinum vestanfyri.

Síðani er makrelurin í Norðsjónum uppfiskaður, samstundis sum at hin stovnurin bara veksur, og so kemur ójavnvág í kvoturnar.

Hann heldur, at fyri at kunna semjast um ein býtislykil, er tað eisini neyðugt at hyggja eftir ferðingarmynstri, gýtingarøkjum, føðiøkjum, framleiðsluni í sjónum, støddini á økinum, uppvakstrarøkjum, vetrarøkjum o.s.fr.

Tað er eisini neyðugt at hyggja at, hvussu stóran týdning hesin fiskiskapurin hevur fyri tey ymsu økini.

### Semjan kemur

Altso má býtast út frá einum nógv longri tíðarperspektivi og einum nógv breiðari grundarlagi, enn tað nú verður arbeitt út frá, annars væntar hann ikki, at tað fer at bera til at finna semju.

Men hann væntar eisini, at tað fer at bera til at finna eina semju til síðst.

Hann vísir til svartkjaftin, har fiskiskapurin var komin heilt upp á 2,5 milliónir tons, áðrenn ein semja varð funnin – og tá var tað líka nógv eftir trýsti frá vinnuni, at londini funnu semjuna.

Kanska verður hetta eisini støðan viðvíkjandi makrelinum.

– Krøvini mugu byggja á kunnleika, men ein semja fæst ikki uttan áhaldandi samráðingar, men vit mugu geva tol, tí tað tekur sína tíð.

### Syndarlig gransking

Hinvegin er hann eisini púra sannførdur um, at tað er neyðugt við nógv meiri vitan á økinum fyri at undirbyggja krøvini.

Tað er altso ikki nóg mikið at setast við samráðingarborðið við ES, norðmonnum og øðrum og krevja, at føroyska kvotan verður hækkað, tí at makrelurin er so nógv inni á okkara sjóøki – uttan at hava onnur "prógv" enn at Nólsoyarfjørður kókar í makreli.

– Á hesum øki eru vit eftirbátar, tí vit hava gjørt alt ov lítið við gransking á økinum.

– Vit hava í nógv ár undirmett týdningin av uppisjóvarvinnuni, leggur hann afturat.

Veruleikin er, at uppisjóvarvinnan stendur fyri helvtini av okkara inntøku av sjónum.

Her hugsar hann bæði um tað, vit fiska sjálvir og tað, vit lata øðrum í býti fyri fiskirættindi í fremmandum sjógvi.

– Talan er um týðandi inntøkur og skulu vit klára at verja borg, er tað avgerðandi neyðugt, at vit vita minst líka nógv sum hini londini.

Hini londini fara ikki at granska fyri okkum.

Men tað, sum er hent í hesum føri,



er, at politiski myndugleikin hevur niðurraðfest granskingina á økinum, hóast tað í mínari verð er heilt burturvið av einum framkomnum landi at niðurraðfesta gransking í okkara høvuðsvinnu.

Hann sigur, at á Havstovuni er tað bara hálvtannað, fólk ið starvast innan okkara uppisjóvarvinnu.

– Tað líkist ongum, sigur hann avgjørdur.

Hann leggur afturat, at eru krøvini frá føroyingum væl undirbygd vísindaliga, eru hini londini noydd at lurta eftir okkum.

Hjalti í Jákupstovu sigur, at vit hava eitt havrannsóknarskip, sum er ført fyri at gera allar neyðugar kanningar, men so er eisini neyðugt at seta fleiri fólk at granska upplýsingarnar.

### Søkja sær ikki vitan

*Heldur tú, at ráðstevnan í Norðurlandahúsinum flutti nøkur sjónarmið?*

– Hon flutti neyvan nøkur sjónarmið í aktuellu ósemjuni. Men eg haldi, at hon var sera væleydnað, tí luttakararnir fingu gott innlit í hvussu víttfevnandi spurningurin um uppisjóvarfisk er.

Hjalti í Jákupstovu sigur, at í hesum sambandi vórðu evni viðgjørd sum eitt nú ferðingarmynstir, fíggjarliga støðan hjá skipunum, politisk viðurskifti o.s.fr.

*Men tað vóru kortini nøkur, sum boykottaðu ráðstevnuna?*

– Ja, tað var so aftur av politiskum orsøkum, og tað fáa vit ikki gjørt nakað við.

Men tað, Hjalti í Jákupstovu heldur vera tað mest syndarliga av øllum, er, at tað var so lítil politiskur áhugi fyri ráðstevnuni.

– Tað vóru bara tveir politikarar við á ráðstevnuni, leggur hann afturat.

Hann vísir á, at nógvir politikarar brúka nógva tíð upp á at viðgera okkara høvuðsvinnu, og tí heldur hann, at tað er spell, at teir ikki eisini søkja sær so nógva vitan sum gjørligt um økið.

# Kostnaðarmikið at fiska makrel

**Tað er dýrari at fáa eitt tons av makreli upp úr føroyskum sjógvi, enn um fiskað var sum fyrr í fremmandum sjógvi, sigur Jákup Jacobsen, stjóri í P/F Varðanum, sum eigur trý nótaskip og eitt ídnaðarskip. Skipini hava partrolað eftir makreli í føroyskum sjógvi, og tað er nógv meira orkukrevjandi, enn tá makrelurin verður fiskaður við nót**

*Edvard Joensen*

Tað er kostnaðarmikið at fiska makrel í føroyskum sjógvi, sigur Jákup Jacobsen, stjóri í útgerðarfelagnum Varðin í Gøtu, sum eigur skipini Tróndi í Gøtu, Finn Fríða, Jupiter og Saksaberg. Makrelurin, sum er veiddur í føroyskum sjógvi í summar og í heyst, er fingin við troli. Skipini hava partrolað, og tað er rættiliga nógv meira orkukrevjandi, enn um makrelurin varð fiskaður við nót, sum hann vanliga plagdi at verða, tá fiskað varð sambært strandalandaavtaluni, sum vit ikki hava í dag, sigur reiðarin í Gøtu.

Tórheðin Jensen, umsitingarleiðari hjá Varðanum, hevur yvirlit yvir orkunýtslu hjá skipunum, og hann vísir á, at í fjør brúkti eitt av skipunum hjá Varðanum, Finnur Fríði, heilt nógv meira orku til at trola, enn tá fiskað varð við nót. Tølini eru sett upp í faktaboks aðrastaðni á síðuni.

Tað er ikki gjørt upp enn, hvussu býtið fyri 2010 hevur verið, tí verða tøl frá 2009 brúkt. Tórheðin Jensen sigur tó, at tølini fyri troling eftir makreli í ár og troling eftir sild í fjør líkjast heilt nógv.

## Lágur prísur

Hóast nøgdin av makreli, sum skipini hava veitt í ár, er størri, enn hon fyrr hevur verið, er ivasamt, um tað vigar upp í móti tí lága prísinum, sum hevur verið givin fyri makrel í summar og í heyst. Meðalprísurin í ár hevur verið D.KR 3,70, sigur Jákup Jacobsen. Tá er sjálvandi tað, sum er farið til mjølframleiðslu, íroknað. Faroe Pelagic í Kollafirði hevur í meðal latið 4,93 kr. fyri sild og makrel til matna.

Hetta er tað lægsta, prísurin hevur verið síðan 2004. Og hóast hann varð hildin at vera lágur í fjør, hevur hann í ár ligið um bert eina góða helvt av tí lága 2009 prísinum.

Ein partur av orsøkini er, heldur Jákup Jacobsen, at makrelurin er fiskaður so tíðliga á árinum, og tí ikki fitnaður. Fyrsta landingin í ár var tann 11. juli og seinastu ferð, skip hjá Varðanum landaði, var tann 16. september. Síðan hava tey ikki fingið makrel, men eru farin at fiska sild.

Høvdu vit kunnað bíðað við at fiska makrelin til nú, høvdu vit ivaleyst eisini kunna fingið betri prís fyri hann, halda teir í Gøtu.

Sum dømi vísir umsitingarleiðarin ein lista við landingarprísum frá



*Jákup Jacobsen, stjóri í P/F Varðanum*

Norges Sildesalgslag, har makrelur tann 10. oktober í ár varð seldur fyri 14,33 NOK., sum er tað sama sum 13,15 DKR.

## Mismunur

Men kanska er hetta bara prísur, sum norðmenn fáa, og føroyingar ikki høvdu fingið, heldur Tórheðin Jensen, umsitingarleiðari hjá Varðanum.

Hetta grundar hann á, at Saksaberg, sum landaði í Noreg fyri stuttum, fekk DKR. 3,20 fyri sild, um somu tíð sum norðmenn seldu fyri DKR. 3,70 ella eina hálva krónu meira enn Saksaberg fekk.

–Tað er eingin grund til at halda annað, enn at hetta er beinleiðis hevnisøka móti føroyingum, tí als eingin munur var á fiskinum, hvørki í støðd ella fiti, sigur hann.

Og hetta eru ikki einastu fótonglar, sum lagdir verða fyri føroyingar, og sum føroysku reiðararnir seta í samband við makrelveiðuna, sum verið hevur undir Føroyum í summar.



*Tórheðin Jensen, umsitingarleiðari hjá Varðanum*

Føroysk skip hava beinleiðis verið boykottað í fremmandum havnum í summar. Til dømis mátti Jupiter rýma úr Peterhead aftur til Føroya við lastini við teirri avleiðing, at samlaða avreiðingarvirðið lækkaði við fleiri hundraðtúsund krónum.

Tað, sum kanska kann gerast enn verri, er, at bæði norðmenn og ES leggja trýst á føroyingar og koma við beinleiðis hóttanum móti føroyingum. Eitt nú at siga bæði handilsavtaluna og fiskiveiðuavtaluna upp.

ES hevur hótt við, at so leingi Havsbrún framleiðir alifóður úr makreli, sum føroyingar hava fiskað av egnari ásettari kvotu, fer ES at seta innflutningsforboð móti føroyskum laksi, sum er fóðraður við hesum fóðrinum.

Og hetta tykist ikki vera berur heilaspuni. Í hvussu er vátta alarar, blaðið hevur havt samband við, hesar hóttanir.

**Meðalpísir**
**fyri sild og makrel 2010**

| *Keypari* | *Meðalprísur DKR.* |
|---|---|
| Sildelaget | 5,15 |
| Faroe Pelagic | 4,93 |
| Fresh Catch | 5,68 |
| Lunar Freezing | 5,48 |
| Isfelag | 4,25 |
| Loðnuvinnslan | 2,77 |
| Havsbrún | 2,68 |
| Sildavinnslan | 2,7 |

**Meðalprísur**
**fyri makrel 2004 – 2010**

| *Ár* | *Písur í DKR.* |
|---|---|
| 2004 | 8,4 |
| 2005 | 13 |
| 2006 | 9 |
| 2007 | 8 |
| 2008 | 10,3 |
| 2009 | 6,6 |
| 2010 | 3,7 |

*Øll árini uttan í 2010 er størsti parturin av makrelinum avreidddur uttanlands*

**Orkunýtsla í prosentum hjá Finni Fríða 2009**

| *Fiskaslag* | *Reiðskapur* | *Oljunýtsla í %* | *Eftir til reiðaríðið (dekningsbidrag)* |
|---|---|---|---|
| Svartkjaftur | Trol | 27% | 42% |
| Sild | Trol | 13% | 58% |
| Makrelur | Nót | 4% | 69% |

## Framtíðin

Jákup Jacobsen, stjóri í Varðanum, heldur, at tað er skilagott at royna at fáa eina avtalu um makrelin.

–Hóast vit í ár hava fingið størri nøgdir av makreli í Føroyskum sjógvi, enn vit nakrantíð fyrr hava sæð her, er einki at ivast í, at hann eisini skjótt kann flyta úr aftur føroyskum øki. Og hava vit ikki tá eina avtalu, standa vit eftir við ongum.

Hann sigur, at sjálvandi eiga vit at stríðast fyri hægri kvotu, men ivast í, um tað er realistiskt at rokna við, at vit fáa 15.000 tons meira av makreli. Skulu vit hava eina so stóra øking, skal onkur annar lata burtur av sínum, og tað verður neyvan bara uttan nakað, væntar hann.

–Hví skulu vit taka 15.000 tons, heldur enn at taka ein triðing fyri sama prís, spyr hann.

Hann vísir á, at virkið í Kollafirði, sum tekur í móti uppsjóvarfiski, er hollendskt. Tað vil siga úr ES. Og hann óttast fyri, at tað kann koma so vítt, at ES steðgar virkinum. Hendir tað, at vit onga móttøku hava í Føroyum, eru vit í ringari støðu.

Eitt annað er, vísir Jákup Jacobsen á, at vit skulu eisini hava ein sáttmála við russar, og nú svartkjafturin er so illa fyri, sum hann er, verður bara makrelur eftir at samráðast við. Russar hava í ár fingið 14.000 tons av makreli frá føroyingum og tosa nú um 20.000.

ES er farið at leggja trýst á okkum í fiskivinnusamráðingunum, vísir hann á. Fyrr hevur makrelurin verið seinastur á skránni, men hesaferð er hann fyrstur. Tað tulkar hann soleiðis, at fæst ikki ein avtala um makrelin, kann ES í ringasta føri finna uppá at boykotta sildina.

# Tá ið arbeiðið kemur í tvídrátt við samdøgursrytmuna



Øll dýr og allar plantur á jarðarknøttinum hava eina samdøgursrytmu. Høvuðsorsøkin til tess er, at livandi lívverur hava lagað seg eftir snúningum hjá jørðini um ásin, av tí at jørðin umframt at snara rundan um sólina, eisini snarar um sín egna ás. Hetta ger, at vit um meginpartin av jarðarknøttinum hava býtt samdøgrið greitt upp í nátt við myrkri og dag við ljósi. At laga seg eftir nátt og degi er neyðugt fyri at fáa gagn úr tí orku, sum er í sólarljósinum, umframt at gagnnýta teir møguleikar, sum ljósið gevur okkum fyri at kunna arbeiða og harvið lívbjarga okkum. Um næturnar minkar virksemið hjá flestum lívfrøðiligum mekanismum fyri at spara orkunýtsluna.

Her skal tó verða viðmerkt, at mong smá dýr eru „náttdýr“, sum leita sær føði í myrkri. Myrkrið er verja hjá hesum dýrum, sum eru óvard og av tí sama í størri vanda fyri at verða tikin og etin av øðrum kjøtetandi dýrum um dagin. Samdøgursrytman hjá náttdýrum er tí øvut av samdøgursrytmuni hjá menniskjum, og náttdýrini hava sína hvíldarløtu um dagin.

Hjá øllum súgdýrum stýrir „innara urið“ í heilanum likamsins samdøgursrytmu. „Innara urið“ er eitt meingi av nervakyknum, sum liggja í fremsta og niðasta parti av heilanum, beint har sum sjónarnervarnar ganga inn í hann. Sjálvt „urið“ liggur í einstøku kyknunum, sum hýsa nøkrum ávísum arvaeginleikum, sum verða róptir „klokkuílegur“ og elva samdøgursrytmuna. Áhugavert er, at hesar ílegur eru evnafrøðiliga samansettar á sama hátt í bæði plantum og dýrum, sum vísir, hvussu grundleggjandi mekaniska samdøgursrytman er í øllum hesum sløgum.

Í einum nýtíðar samfelag kunnu vit, ravmagnsljósinum at takka, virkin gagnnýta ein størri part av samdøgrinum. Tað kundi tí væl hugsast, at innara urið í menniskjum tey komandi ættarliðini kann venja seg við ein longri dag.

## Ljósið stýrir menniskjunnar egnu samdøgursrytmu

Samdøgursrytman í menniskjum kann vera ymisk til longdar frá einstaklingi til einstakling. Tó hava einstaklingar flestir eina „innari samdøgursrytmu“, ið er ein hálvan tíma longri enn samdøgursins 24 tímar. Henda „innara samdøgursrytma“ kann verða eygleiddi hjá einum einstaklingi, sum er staddur í einum myrkum rúmi við ongari ávirkan uttaneftir. Undir hesum umstøðum flytur persónurin samdøgursrytmu sína ein hálvan tíma hvørt samdøgur (viðkomandi fer at leggja seg at sova ein hálvan tíma seinni hvønn dag).

Høvuðsorsøkin til, at menniskju ikki flyta svøvnløtuna við einum hálvum tíma hvørt samdøgur, er, at ljósið – sum hvønn morgun rakar eyguni í persóninum og verður fatað av nethinnuni í eygunum – hevur tamarhald á „innara urinum. Hetta ljós verður sent víðari frá nethinnuni gjøgnum sjónarnervarnar inn til „innara urið“ í heilanum, sum á henda hátt verður „stillað“ rætt hvønn morgun.

> **At laga seg eftir nátt og degi er neyðugt fyri at fáa gagn úr tí orku, sum er í sólarljósinum, umframt at gagnnýta teir møguleikar, sum ljósið gevur okkum fyri at kunna arbeiða og harvið lívbjarga okkum.**

## Týdningurin, sum svøvnur hevur

Svøvnurin er ein onnur grundleggjandi, lívsneyðug tilgongd, har lívfrøðiligar tilgongdir í kroppinum koma fyri seg aftur. Bæði menniskju og dýr doyggja eftir eitt ávíst dagatal, um tey ónatúrliga verða hildin vakin. Ein svøvndepil stýrir svøvninum. Svøvndepilin er ólíkur samdøgursrytmudeplinum ("innara urinum"). Er svøvndepilin samskipaður við samdøgursrytmudepilin, hava vit ilt við at sovna.

Her hava vit kjarnan til teir heilsuligu trupulleikarnar í sambandi við at arbeiða í skiftum. Fólk flest vita, at fyrstu náttarvaktina kemur svøvnur skjótt á teg, og tú verður linur millum kl. 4 og 5 á morgni. Óteljandi royndir við hesum hava víst, at um hetta tíðarbilið hava vit ikki so lætt við at savna okkum um arbeiðið, og at kroppurin er „strongdur“. Hesa síðstnevnu „strongd“ ber til at máta í blóðinum, har tað sæst, at innihaldið av ymisku strongdarhormonunum er hækkað. Somuleiðis vísa ymiskar uppgerðir, at livitíðin hjá fólki við nógvum vaktararbeiði er lægri.

Í mínum egna starvi sum lækni høvdu yvirskurðlæknarnir, ið arbeiddu hart á smáu sjúkrahúsunum, munandi styttri livitíð enn fólkið annars. Tey hækkaðu „strongdarhormonini“ í blóðinum hava við sær økt blóðtrýst við tí harav økta vandanum fyri hjarta- og nýrasjúkum. Somuleiðis slíta onnur „strongdarhormon“ likamsins kyknur við at bróta niður eggjahvítaevnini í teimum.

## Hvussu lagar ein seg best til vaktararbeiði

Aftur ímóti skurðlæknanum, sum arbeiðir hart, og sum nevndur er her omanfyri, var tað áður í heilsuverkinum sermerkt, at fasta náttarsjúkrasystirin doyði ikki fyrr enn onnur. Frágreiðingin kann vera, at hon hevði fingið lagt um og vant sítt „innara ur“ til náttararbeiðið, og tí ongan tvídrátt hevði ímillum urið og svøvnin.

Tað krevur menniskjum flest trýfýra samdøgur at broyta samdøgursrytmuna í sambandi við, at tey skulu byrja í einum nýggjum. Tí er tað ráðiligt í sambandi við slíkt arbeiði at hava sama skifti í eitt rímiliga langt tíðarskeið og at royna at halda seg frá mongum og títtum skiftum. Ber ikki til at sleppa undan stuttum tíðarskeiðum við vaktararbeiði, so er neyðugt við nóg longum hvíldartíðum (døgum) millum arbeiðstíðarskeiðini.

## Týdningurin, sum ljósið hevur

Av tí at ljósið hevur týdningarmiklan leiklut fyri at flyta „innara urið“ í heilanum, hevur ljósbúnaðurin á arbeiðsplássinum ein týdningarmiklan leiklut fyri at halda trupulleikarnar av vaktararbeiði burtur. Royndirnar vísa, at ljósið skal vera ógvuliga bjart fyri at kunna flyta hetta urið. Meginparturin av tí ljósbúnaði, sum er á einum arbeiðsplássi, er lægri enn tann styrki, sum mælt verður til. Tí hevði tað verið vert at umhugsað eina íløgu til betri ljósbúnað.

Klárt dagslýsi er optimalt fyri at flyta „urið“. Í handlinum kunnu vit í dag keypa serligar dagslýsislampur, sum hóska væl til at flyta urið við. Tað eru somu lampur, sum eisini verða brúktar til at lætta hugtyngslu á vetri. Umhugsar tú hesar lampur, skalt tú leita tær ráð hjá læknanum, tí lampurnar eru serframleiddar til at kunna geva eitt lýsi, sum líkist dagslýsi. Til arbeiðsplássini eru serlig ljósrør at fáa, sum veita ljós av dygd sum dagslýsið.

Kongulskertilin í heilanum ger eitt hormon, melatonin, sum verður stýrt av og eins og ljós kann flyta „innara urið“ í heilanum. Tí ber til at skunda undir at flyta urið við at taka melatonin o.u. ein hálvan tíma frammanundan, at tú ætlar at sova. Melatonin er ikki at fáa í Danmark, men læknar kunnu umvegis ein ávísingarseðil biðja apotekið framleiða ein bolla við melatonini.

Hvørki ljós ella melatonin kunnu reiðiliga taka heilsuligu trupulleikarnar í sambandi við skiftisvaktararbeiði burtur. Mest umráðandi er tí at laga skifti síni á ein skilagóðan hátt, og at samfelagið ásannar, at menniskju við slíkum arbeiði skulu hava so mikið av frítíð, at kroppurin ikki slítist meir enn neyðugt.

*Kelda:*
*Morten Møller, professari dr.med.*

# Eftirlønir á vegamóti





Seinastu tíðina hevur nógv verið at hoyrt um penjónsnýskipanina. Seinasta nýggja er, at nýskipanin verður sett í gildi 1. januar 2012.

Hetta skyldast fleiri viðurskiftum. Serliga er tað ásetingarnar um mótrokning í øðrum almennum veitingum, sum skilja partarnar.

Tó tykjast tingfólk vera samd um høvuðsinnihaldið. T.v.s. at byrja verður við einum bundnum inngjaldi galdandi fyri allar lønmóttakarar millum 18 og 67 ár. Byrjað verður við einum inngjaldi á 3% og veksur hetta síðani við 1,5% árliga, inntil við røkka einum árligum inngjaldið á 15%.

Eisini er semja um, at spart kann verða saman á kapitalgrundarlagi, sum merkir at samansparingin fellur til arvingar, um eigarin doyr áðrenn fylta 67 ár.

Frádráttur í sambandi við inngjøld til kapitaleftirløn og eftirløn í lutum, sum vit kenna tað í dag, eru ikki partur av nýggja uppskotinum. Her verður frádráttur veittur fyri samlaða inngjaldið uttan mun til upphædd, men so verður goldið út aftur eftir føstum leisti ístaðin.

Lagt er upp til, at 10% av samansparingini kunnu gjaldast út í einum og síðani kunnu 45% rindast út sum eftirløn í lutum (garanterað útgjald yvir 10 ár) og 45% sum lívrenta, útgoldin so leingi eigarin er á lívi.

Hetta er tað, sum í mesta lagi kann býtast út á kapitaleftirløn. Ynskir eigarin at fáa størri part út sum lívrenta og ella eftirløn í lutum, er møguleiki fyri hesum eftir ávísum ásetingum.

Sum uppskotið liggur í løtuni, verður eisini loyvt at nýta part av inngjaldinum til at keypa sær tryggingarveitingar.

Tá goldið verður inn til eftirlønarskipan yvir eitt langt áramál, er tað umráðandi at fáa so góða rentutilskriving sum gjørligt. Hetta merkir, at eigarin má hava møguleika at velja tann veitaran, sum gevur besta avkastið.

Føroya Skipara & Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið hava tí gjørt avtalu við Betri pensjón, sum letur upp fyri, at limirnir nú kunnu velja millum tveir veitarar.

Betri pensjón er fyrsta føroyska tryggingarfelagið, sum rentar samansparingina við marknaðarrentu. Veljast kann millum 5 íløgubólkar og eigarin fær tað avkastið sum marknaðurin gevur. Nærri frágreiðing er at finna á www.betri.fo.

Tað gevur eisini fyrimunir, at savna allar sínar tryggingar í samtakinum hjá TF-Holding, sum er eigari av Betri pensjón og Tryggingarfelagnum Føroyum. Verða goldnar inn kr. 18.000,- ella meira í einum ári til Betri pensjón, gevur hetta ein avsláttur á 20% í teimum privatu tryggingunum, sum eru teknaðar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum. Hetta kemur afturat avsláttrinum, sum Tryggingarfelagið veitir í mun til tal av teknaðum tryggingum, ið er upp til 15%.





# Sundsverkið fingið ISO 14001 góðkenning



*Dánjal Vang handar vegna Det Norske Veritas (DNV) Jákupi Sørensen, verkmeistara á Sundsverkinum, søguliga ISO 14001 skjalið.*

Sundsverkið er sum fyrsta framleiðsluvirkið í Føroyum ISO 14001 sertifiserað.

Góðkenningin umfatar elframleiðslu og goymslu og bunkring av tungolju.

–SEV hevur sett sær sum mál støðugt at fremja ábøtur á umhvørvisøkinum, og í hesum sambandi hevur serliga seinastu tvey árini verið arbeitt miðvíst við at fáa eina ISO 14001 umhvørvisleiðsluskipan á Sundsverkinum, sigur Annika F. Berg, HTU-leiðari á SEV (HTU stendur fyri heilsa, trygd og umhvørvi).

DNV (Det Norske Veritas) hevur nú góðkent skipanina, og í hesum sambandi handaði umboð fyri stovnin verkmeistaranum á Sundsverkinum sertifikatið á lítlari samkomu á verkinum.

## Eitt leiðsluamboð til burðardygga framleiðslu

ISO 14001 er eitt leiðsluamboð, ið skal hjálpa fyritøkum at stýra tilgongdum fram ímóti eini meira burðardyggari framleiðslu.

Leiðsluamboðið hjálpir fyritøkuni at fáa yvirlit yvir umhvørvisárinini, eitt nú burturkast, spillvatn, oljunýtslu, rávørunýtslu, vatn, elnýtslu osfr. Haraftrat hjálpir amboðið fyritøkuni at eyðmerkja og seta í verk møguligar ábøtur, har fokus er á útreiðslu-effektivum loysnum.

Hetta merkir, at fyritøkan – umframt at økja vitanina innan burðardygga framleiðslu og minka um dálkingina – kann bøta um effektivitetin innanhýsis í fyritøkuni, betra um orku- og elnýtslu, eins og minka um burturkast og spillvatn, herundir minka um rakstrarútreiðslurnar, sigur Janet Fríða Johannesen í ráðgevingarvirkinum Atlanticon, sum hevur verið ráðgevi hjá SEV at seta ISO 14001 skipanina í verk.

## Umhvørvið í miðdeplinum

– Við ISO 14001 hevur SEV sett eina skipaða og framhaldandi stýring í verk á Sundsverkinum við atliti at umhvørvinum, sigur Jákup Sørensen, verkmeistari á Sundsverkinum. Umhvørvisleiðslustýringin er ein fastur partur av samlaða leiðsluvirkseminum í fyritøkuni, leggur hann aftrat.

Á odda fyri hesum arbeiðnum hava staðið Annika F. Berg, HTU-leiðari, Páll Hansen, maskinmeistari, og Janet F. Johannesen, ráðgevi. Haraftrat hevur alt starvsfólkið á Sundsverkinum fingið upplæring í ISO 14001 skipanina.



*Starvsfolk á Sundsverkinum*

– Við hesi leiðsluskipanini bindur SEV seg til at fremja ábøtur á umhvørvisøkinum við allatíðina at seta sær nýggj mál og virkisætlanir, sigur Annika F. Berg, sum hevur verið HTU-leiðari á SEV síðani 1. november 2008.

## Stjórin fegnast

SEV-stjórin fegnast um góðkenningina og takkar starvsfólkunum fyri avrikið:

– Vit eru bæði glað og stolt av at hava fingið hesa góðkenning. SEV gongur undan á umhvørvisøkinum, og er hetta eisini í fullum samsvari við HTU-politikk okkara, sigur Hákun Djurhuus, stjóri.

– Tilgongdin hevur verið bæði drúgv og tíðarkrevjandi, men eg veit, at nógv fólk hava lagt eitt stórt arbeiði í hetta, og tað hava tey rós uppiborið fyri, sigur ein errin SEV-stjóri.

Eftir ætlanini verður Vágsverkið næsta elverkið í røðini hjá SEV, sum verður ISO 14001 sertifiserað. Enn er støða tó ikki tikin til, nær farið verður undir hetta arbeiði.



*Annika F. Berg, HTU-leiðari, Páll Hansen, maskinmeistari, og Janet F. Johannesen, ráðgevi.*

# Klakkur og Jákup B



Føroya Sjómannadagur heiðraði línuskipini Klakk og Jákup B í sambandi við, at 50 ár eru liðin síðani skipini komu sum nýbygningar á Klaksvík.

Í samfull 50 ár hava Klakkur og Jákup B verið álítandi arbeiðspláss býi og fólki at frama.

Skipini hava serligt heiðurspláss á Stangabrúnni, og øll vóru hjartaliga vælkomin at vitjað umborð, har kaffi og køkur vóru at fáa úr messuni.

Kl. 15 varð stór felagsmynd tikin á bryggjuni framman fyri Klakk av øllum, sum hava siglt við Klakki. Og kl. 15.30 var felagsmynd tikin á bryggjuni framman fyri Jákup B av øllum, sum hava siglt við Jákup B.





**Fakta um Jákup B:**

- Línuskip (3)
- IMO-nummar: 5167968
- Telefon: 28 88 34
- MMSI-nummar: 231 180 000
- Smíðistaður: Floro, Noreg
- Smíðiár: 1960
- Tilfar: Stál
- Klassi: DNV 1A1, ICE-C
- LOA: 43,35 m
- Breidd: 7,50 m
- Dýpd: 3,87 m
- BT: 384,00
- NT: 133,00
- BRT: 298,00
- Ravmagn: 3 * 220V Ac.
- Ljósmotorar: 2 * Valmet 110 kW (1999)
- Maskina: Callesen Diesel, 6s, 4t (1987)
- Maskinorka: 508 kW/690 HK, 425 rpm

**Eigari:**
EFHO P/f
Stangavegur 53
700 Klaksvík

**Útgerðarmaður:**
Óli M. Lassen
Garðavegur 49
700 Klaksvík
Tel. 45 55 90








**Fakta um Klakk:**

- Línuskip (3)
- Manningartal: 14
- IMO-nummar: 5189930
- Telefon: 211325
- MMSI-nummar: 231 145 000
- Irdiumnummar: 0088 1621 415 940
- Smíðistaður: Floro, Noreg
- Smíðiár: 1960
- Tilfar: Stál
- Klassi: DNV 1A1, ICE-C
- LOA: 38,01 m
- Breidd: 7,50 m
- Dýpd: 3,85 m
- BT: 355,00
- NT: 103,00
- BRT: 318,00
- NRT: 156,00
- Ravmagn: 3 * 380/220V Ac.
- Ljósmotorar: 2 * Valmet 110 kW (1999)
- Maskina: Callesen Diesel, 5-s, 4t (1986)
- Maskinorka: 423 kW/575 HK, 426 rpm

**Eigari:**
Undir Klakki Sp/f
Undir Klakki 35
700 Klaksvík

**Útgerðarmaður:**
Líggjas Johannesen
Undir Klakki 35
700 Klaksvík
Tel. 45 57 25







# Vitjan fyri innbodnum umborð á Athenu

24. september var vitjan – fyri innbodnum – umborð á Athenu, ið lá við bryggju á Kollafirði. Regin Olsen umboðaði Maskinmeistarafelagið. Umboð fyri Skipara- og Navigatørfelagið vóru Eyðstein Djurhuus, Ellintur Abrahamsen, Leif Joensen og Annfinn Garðalíð. Umboð fyri felagið greiddi frá útgerðini umborð og vístu gestunum runt á skipinum.













**Teknisk data um Athenu**

- Call sign: OW 2133
- MMSI: 231 411 000
- IMO no: 8907096
- Vessel Type: Freezing and factory
- Class: Fishing vessel stern trawler KMC ICE-C
- Built: 1992, extensively rebuilt 2010
- LOA: 105.00 m
- Breadth: 20 m
- Depth 1 deck: 9.20 m
- Depth 2 deck: 11.80 m
- Depth trawl deck: 14.70 m
- Draft (min): 7.00 m
- Draft (max): 9.15 m
- Displacement: 10408,00 T
- Deadweight: 5467,00 T
- Main engine: WARTSILA-16V32D-5920kW/8050HP. RPM-720
- Aux. Engine: 2 Deutz/MVM BV6M – 1030kW/1400HP – 1000rpm
- Harbour Generator: 1pc Cummins C300D5 – 240kW/300kVA – 1500rpm
- Generators: 2 Indar 560 – 1200kVA – 3x380V/50Hz – 1000rpm
- 1 Indar 630 – 3200kVA – 3x380V/50Hz – 1500rpm
- Speed: Max speed: 14.5 knots Cruising range: 9000 n.m.
- Propeller: Controllable, 4 blades. Dia-4000 mm. RPM-155
- Bulb: Available
- Bow thruster: 440 KW/6OO HP
- Rudder: Type- "FLAP"
-

**Capacities:**

- Fuel oil: 1.509,50 m 3
- Diesel oil: 109,20 m 3
- Lub oil: 33,70 m 3
- Fresh water: 446 m3
- Ballast: 96,10 m3
- Fish oil tanks: 205,80 m3
- RSW tanks (upper): 445,00 m3
- RSW tanks (down): 452,34 m3
- Frozen cargo hold (upper): 1.965,70 m3
- Frozen cargo hold (down): 4.296,00 m3

**Accommodation:**

Crew: Maximum 125 persons

**Radio and Navigation equipment:**

- A1+A2+A3: 2 x Inmarsat-C Furuno Felcom-15 one with built in SSAS
- 2 x DSC-VHF Transceiver class A Furuno FM-8800
- 3 x portable VHF McMurdo R2, 1 x MF/HF SSB Transceiver w/ DSC Furuno FS-1570
- 1 x Navtex-receiver Furuno NX-700-B, 2 x GPS-receiver Furuno GP-150
- 1 x COSPAS-SARSAT EPIRB McMurdo E-5-A
- 1 x COSPAS-SARSAT EPIRB McMurdo G-5-M
- 2 x SART McMurdo S4, 1 x X-band Radar Furuno FAR-2117-IMO

**Communication:**

- Sat athena.bridge@thor.fo
- Captain athena.captain@thor.fo
- Skyfile athena@skyfile.com
- Engine athena.engine@thor.fo
- Factory athena.factmgr@thor.fo
- Deckboss athena.deckboss@thor.fo

- Tel.: IP Bridge +1 954 672 3852
- Tel.: Mini-M +870 762 002 539/40
- Skype bridge athena.bridge
- Skype Captain athena.captain
- Skype engine athena.engine
- Skype Chief athena.chief
- Skype factory athena.factmgr
- Skype deckboss athena.deckboss
- InmarsatC: 423141110/11/12/13

# Mangir sigldu við Brandi Sigmundarsyni

**Á Grækarismessu skipaðu menn, sum høvdu siglt nógv við Brandi Sigmundarson, fyri samkomu á Hotel Føroyum. Ein av teimum, ið tók lut var Regin Nónstein, vit hava fingið loyvi at prenta ein part av røðuni hann helt á samkomuni á Hotel Føroyum.**



*Regin Nónstein*

Regin greiður soleiðis frá: Tann 17. apríl 1962 kom eg við Brandi fyrsta túrin. Av røttum skuldi eg koma við New Foundlansdstúrin, men vegna sjúku heima fekk eg loyvi til at koma við næsta túr. Tann 9. august 1967 mynstraði eg av og fór uppá skúla tað heystið, og tók skipsførara prógv i 1970. Eg fekk alla mína siglingstíð við Brandi yvir tey 6 árini eg varð við.

### Behagiligur skipari

Andreas var ein ógvuliga stillur og behagiligur skipari at verða saman við. Tað hoyrdist ikki nógv til hann uttan tað vanliga: „skjót“ og „hálað“ og „koyr í karvarin“. Ikki tí, hann hevði mál at rópa við.

Tað gav at bíta, vit háladu í bakborð. Nógv móðra var í. Bellurin var snodlaður nakað upp og vit høvdu fingið nær um í gjørðina fyri at krøkja gilsin í, tá hendi tað, at maðurin, sum snodlaði upp, misti tørnið av koppinum, posin rusjaði út og tað stóð til grunnin.







### Sonny reyk fyri borð

Sonny, ið stóð á hylluni og dróg skiftilínina inn bleiv fastur í henni og reyk fyri borð. Tað eydnaðist honum tíbetur at gera seg leysan av skiftilínuni og fekk klóra seg upp eftir bellinum so, at man fekk tikið hann inn um aftur. Hetta var ein nervapirrandi løta hjá okkum øllum til vit sóu Sonna aftur.

Tað skal sigast, at vit vóru serliga spardir fyri skaðar hesi fyrstu árini. Hvussu tað var eftir 1967 veit eg einki at siga um.

Tey fyrstu árini vóru túrarnir ikki so langir – umleið 3 mðr. hvør. Vaktirnar vóru 6 og 6 og menn høvdu góðar svøvngávur. Tað kom fyri, at onkur fór upp á brúnna at halda skiparan við prát, og til tíðir kundi látur hoyrast niður á dekkið.

### Frítíðarítriv

Frítíðin var nógv, og hvat gjørdu so menn á frívakt?

Jú, borðabátar, skip, dukkusengur, hvølpalás og annað mangt varð gjørt.

Tað sást týðuliga at handalagið var gott.

Kortspæl í messuni varð eisini havt á lofti. Bókakassin varð eisini umborð til teir, sum høvdu hug at hava eina bók í hondini.

### Styrkiroyndir

Styrkiroyndir vóru eisini á skránni. Bæði yngri sum eldri royndu seg. Frammi undir bakkanum lá ein topprulla. Hana royndu fleiri at lyfta. Ein hoyrdi larmin undir bakkanum, tá menn á frívakt lógu og buktaði seg at lyfta. Tikið var um ovara kant og so lyfta rullina uppfrá. Bert ein kláraði at lyfta. Hann verður ikki nevndur, men tó er hann kendur.

Eisini Kelvið var roynt. Hetta var eitt petti av einum kustaskafti, sum tveir hildu um í hvør sínum enda. Menn togaðust tvørtur um borðini í messuni. Endin var, at tveir suðringar komu at togast móti hvørjum øðrum – ein úr sunnasta enda- og ein frá norðasta enda av oynni. Tann frá norðasta enda fór við sigrinum.

### Vøttin um oyrini

Tað gekk ikki altíð so friðaliga fyri seg á dekkinum. Tað kom meir enn so fyri, at maður fekk vøttin um oyrini, tí orð fullu sum ikki hóvaði einum. Minnist meg rætt, so var ein orrustan afturi við spælið tá Bjørn gav Óla ein ótøvdan vøtt um oyrini, tá varð ikki gott vorðið.

Ein onnur hending var, tá trolið í stýriborð var skrætt og menn royndu at fáa tað heilt aftur. Eisini posin skuldi yvirhálast, húðir skuldi skiftast og nýggj setast undir. Hetta var ein stór kúgvahúð, halin varð skorðin av og tveittur til viks. Trýggir mans lógu á posanum og ein av hesum varnaðist ikki at halin varð krøktur í beltið aftanfyri. Ein løta gekk og so við eitt kom halin sendandi aftur gjøgnum rúgvuna – tað skuldi eingin her umborð halda seg til rukku, jú, menn vóru heitir um oyruni til tíðir. Tað kom ongantíð fram hvør hevði hongt halan í beltið hjá Mortani.



*Mortan Johannesen*

# Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum

## Brot úr dagbókini

**29-06-10. FF.**
Fundur millum MF, FSN og FF um samlagstryggingina, sum fór úr gildi 31/12-2008.

**02-07-10. MF.**
MF, FSN og FF undirskriva eina avtalu um samstarv millum føroysku sjómannafeløgini. Nýggi felagsskapurin hevur fingið navnið Faroese Maritime Unions, stytt FMU.
Endamálið við FMU er at fáa í lag skipaði sáttmálaviðurskifti fyri útlendsk sjófólk, ið sigla við skipum í FAS.

**14-07-10. FSN.**
Blaðfundur: Mið og Magn.

**16-08-10. FF.**
Fundur millum manningarfeløgini og Fiskavirking.
Fiskavirking greiddi frá, at teir ætla at fara at trola eftir makreli við einum pari av ísfiskatrolarum.
Tosað varð um, hvussu manningin við hesum skipum skuldi lønast.

**17-08-10. Fiskimálaráðið.**
Fundur í bólkinum viðv. inntøkutrygd fiskimanna.

**19-08-10. FF.**
Formansfundur MF, FSN og FF.
Tosað var um sáttmálan við Føroya Reiðarafelag, millum annað um hann skal sigast upp ella ikki.
Her var víst á, at FR hevur meldað út, at um broytingar verða gjørdar í galdandi reglum um inntøkutrygd, so fellur allur sáttmálin burtur.

**24-08-10. Lív. Hotel Hafnia.**
Kunnandi fundur um komandi eftirlønarskipan, sum eftir ætlan skal setast í gildi 1. januar 2011.

**25-08-10. Starvsmannafelagið.**
Fundur fyri teimum fakfeløgunum og virkjum, sum hava eftirlønarskipan hjá Lív.
Jógvan Mørkøre greiddi frá gongdini í málinum um ognarviðurskiftini, nú Lív er lýst til sølu.

**26-08-10. MF.**
Fundur við álitismenninar hjá SSL, um ymisk viðurskifti, millum annað Smyril í dokk og sáttmálasamráðingar.

**30-08-10. MF.**
Nevndarfundur har 12 mál vóru á skránni millum annað komandi sáttmálasamráðingar við Fíggjarmálaráðið.
Komandi formansval, hvussu leggur man um frá tí vit hava í dag til ein fulltíðar formann, longd av valskeiðið, løn o.a.

**30-08-10. Føroya Reiðarafelag.**
MF, FSN og FF saman við FR. Tosaðu um framtíðar sáttmálar eftir at inntøkutrygdin er broytt.

**30-08-10. Fiskimálaráðið.**
Bólkurin viðv. inntøkutrygd hevði fund saman við landsstýrismanninum.

**03-09-10 MF.**
Fundur við CREW, sum m. a. umboðar Nor Lines.
CREW upplýsti annars, at tey hava 10 skip undir FAS og fleiri eru á veg. Tey eru ikki limir í RfF, men tey fara helst at gerast limir. Í løtuni hava tey 7-8 føroyskar meistarar og talið er vaksandi.

**03-09-2010 MF.**
Framhald av nevndarfundi 30-08-10
Millum annað var komandi formansval á skránni.

**03-09-10. Vinnuháskúlin.**
Maskinistar, prógvhandan.

**06-09-2010. MF.**
Fundur millum MF og SSl millum annað um dokking hjá Smyril, norðoyggjaleiðina og 1. hvítusunnudag.
Viðvíkjandi 1. hvítusunnudegi kom SSl fram við einum skjali, sum var frá samráðingum við SF í 2003, hettar skjal varð ikki lagt fram í samband við samráðingarnar við MF.

**06-09-2010. FSN.**
Blaðfundur Mið og Magn.

**06-09-2010. Føroya Reiðarafelag.**
Fundur millum FR og manningarfeløgini um komandi avtalur, tá inntøkutrygdin fellur burtur.

**08-09-2010.**
Fundur við Eik og BankNordik um ognarrøkt.

**10-09-2010. Fiskimálaráðið.**
Fundur í bólkinum um inntøkutrygd.

**10-09-2010. FF.**
Fundur millum Føroya Reiðarafelag og manningarfeløgini um komandi sáttmálar

**13-09-2010. MF.**
Fundur millum FMU og útlendskt reiðarafelag.

**14-09-2010. MF.**
Fundur millum MF og SF um ymisk sáttmálaviðurskifti við SSL.

**17-09-2010. Vinnumálaráðið.**
Fundur við Anniku Olsen um Athenu og Poseidon.

**20 09-2010. Tór Shipping,**
Tosa bleiv um at fáa eina avtalu við AMOSUP sum skjótast.

**21.09-2010. Páll Nielsen**
Fundur um at endurskoða og tillaga lógir felagsins, soleiðis at hettar kann leggjast fram fyri komandi aðalfund, fulltíðar formann.

**22-09-2010. Fiskimálaráðið.**
Fundur í bólkinum um inntøkutrygd.

**22-09-2010. FF.**
Fundur millum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag
Um komandi sáttmálar.

**23-09-2010.FSN.**
Blaðfundur Mið og Magn.

**24-09-2010. Fiskimálaráðið.**

**28-09-2010. Sjó- og Vektarbúðin.**
Nágreining av útlendingakunngerðini í mun til arbeiðsmegi umborð á føroyskum fiskiførum

**01-10-2010.FSN**
Blaðfundur Mið og Magn.

### Áminnig/Áheitan

Sum liður í einari verkætlan hjá Maskinmeistarafelagnum, Granskingarkjarnuni fyri veiðitøkni, Havstovuni og Jarðfeingi vórðu spurnabløð viðv. oljunýtslu send maskinmeistarum við fiskiskipum í juni mánaði.
Vit fara við hesum at heita á teir, sum hava móttikið spurnabløðini um vinarliga at fylla tey út og senda tey aftur til Havstovuna ella okkum

### NMF fundur

NMF sum er samtøka av norðurlendskum maskinmeistarafeløgum hevði fund í Reykjavík tann 7. oktober.
Á skránni var m. a. val av leiðslu og fer hetta fram 3. hvørt ár eftir fastari skipan. Hesaferð eigur Finnland leiðsluna og tók Lars Wikstrøm við sum forseti eftir Per Jørgensen úr Danmark.
Um 3 ár eigur Maskinmeistarafelagið tørn til at taka við leiðsluni í NMF.

## „Fakfelagscruise“

Í døgunum frá 6. til 9. september skipaði Smyril Line fyri einari spennandi ferð til Íslands við fakligum innihaldi og útferðum.
Høvuðsevnini vóru álitisfólkaskipanin við Páll Nielsen, advokati og "At tora at standa fram" við Jákup Páll Mohr Mortensen.
Vitjað varð eisini hjá einum íslendskum fakfelagi.
Maskinmeistarafelagið hevur gjøgnum tey síðstu árini fleiri ferðir roynt at fáa skeiðvirksemi fyri álitismenn og nevndarlimir felagsins, men tað var ikki rættuliga eydnast enn.
Eisini meta vit í felagnum, at vit mangla álitismenn innan fleiri sáttmálaøkir. Vit hava í dag 10 ymiskar sáttmálar.
Maskinmeistarafelagið sær álitismennirnar sum ein sera týðandi part av virksemi felagsins. Teir eru okkara umboð úti á arbeiðsplássunum bæði á sjógvi og landi Teir eru við til samráðingar og teir hjálpa starvsfeløgum við praktiskum spurningum.
Tí vil felagið geva sínum álitismonnum so góða útbúgving sum til ber og var „cruise“ ferðin eitt gott høvi til hetta.
Eftirmetingarnar eftir túrin hava verið sera góðar.

### Fulltíðar formaður í Maskinmeistarafelagnum

Sum tað sæst í dagbókini hjá Maskinmeistarafelagnum so hevur nevndin tikið spurningin um framtíðar bygnað hjá Maskinmeistarafelagnum upp til viðgerðar. Hvussu kemur man skjótast frá núverandi skipan til fulltíðar formann?
Semja er í nevndini um, at MF skal hava fulltíðar formann og at gera tær neyðugu lógarbroytingarnar klárar, so hesar kunnu leggjast fram á komandi aðalfundi.
Maskinmeistarafelagið man kunna roknast millum tey miðal stóru feløgini við sinum 550 limum.
Við einum formanni fulla tíð, verða betri stundir til fundarvirksemi og viðgerð av fleiri málum.

**Páll Hansen**

## Føðingardagar hjá limum okkara

| | | |
|---|---|---|
| Jóan Magnus Olsen | 4. november | 60 ár |
| Jens Eli Johansen | 11. november | 60 ár |
| Petur Ove Vesturtún | 25. november | 60 ár |
| Jákup Vørðá Poulsen | 30. november | 60 ár |
| Jan Erik Klein Olsen | 10. oktober | 50 ár |
| Gudmund Hansen | 19. desember | 50 ár |
| John Potts | 23. desember | 50 ár |
| Jákup Andrias Poulsen | 27. desember | 50 ár |
| Høgni Kári Trygvason Nielsen | 29. desember | 40 ár |

# Tíðindi frá Føroya Skipara- og Navigatørfelag

## Brot úr dagbókini

**16-06-10: FSN**
Søfarens Ledere hevur limafund í hølunum hjá FSN. Nógv varð tosa um sáttmálasamráðingarnar sum eru ígongd.

**18-06-10: Vinnuháskúlin**
Prógv verða handa á Vinnuháskúlanum, Regin Nónstein næstformaður umboðaði FSN

**16. til 19-06-10: Manila**
FSN er við til aðalfundin hjá altjóða skipsførarfelagnum IFSMA. Eftir fundin varð ein IMO ráðstevna um endurskoðan av STCW reglunum.

**23-06-10: FSN**
Nevndarfundur í FSN, millum annað varð samtykt at vit skulu vera við til at stovna Faroese Maritime Union, sum skal gera sáttmálar fyri útlendingar við FAS-skipum.

**29-06-10: FF**
Manningarfeløgini tingast um uppgerð av gomlu samlagstryggingini. Sambært upplýsingum frá FF eru 2,6 mill at býta millum feløgini.

**30-06-10: Fróðskaparasetrið**
Kappingarráðið skipar fyri fundi um kostnaðarstøði í Føroyum. Niðurstøðan er at manglandi kapping er høvuðsorsøkin til høgu prísirnar. Flutningskostnaðurin til Føroyar er bert 2 % av prísmuninum, men samstundis er leigu- og lønarútreiðslur hjá handilsfyritøkum nógv lægri her hjá okkum.

**02-07-10: MF**
Faroese Maritime Union verður stovnað.

**08-07-10: Fiskimálaráðið**
Fundur í Fiskivinnuráðnum, til viðgerar er hvussu koma Lemmatrolarar uppí fiskidagaskipanina.

**12-07-10: FSN**
Blaðnevndarfundur hjá Mið og Magn.

**14-07-10: MF**
Nevndarfundur í Faroese Maritime Union, um ætlanir hjá norskum og svenskum fakfeløgum at kæra føroyska flaggi til IFT, sum eitt hentleikaflagg. Hesum fingu vit tíbetur forða fyri.

**20-07-10: Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráðið viðgerð uppskot um at umskipa bólk 5 (útróðarbátar)

**16-08-10: FF**
Fundur við Fiskavirking um makrelfiskiskap hjá skipum teirra.

**17-08-10: Fiskimálaráðið**
Fundur í arbeiðsbólkinum sum ger tilmæli um inntøkutrygdina.

**19-08-10: FSN**
Manningarfeløgini hittast til at gera felags upplegg til samráðingar við Reiðarafelagið (fiskiskip)

**20-08-10: FSN**
Blaðnevndarfundur hjá Mið og Magn

**21-08-10: Klaksvík**
Nógv fólk var komið á sjómannadag, hóast tað regnaði sera illa. Jákup B og Klakkur høvdu báðir 50 ára føðingardag, skipini eru still „going strong“, tillukku frá FSN.

**24-08-10: Hafnia**
Lívstrygging skipar fyri kunnandi fundi um ætlaða pensjónsreformin. Fólk frá fíggjarmálaráðnum greiddu frá komandi lógarbroytingum. Flestu fakfeløg vóru við til fundin.

**25-08-10: Starvsmannafelagið**
Fakfeløgini sum eru kundar hjá LÌV fáa kunning um ætlaða sølu av almenna partinum av Lívstrygging. Landið vil selja síni 50 % av LÌV. Ognarfelagið (kundarnir) eigur hina helvtina av partapeninginum.

**30-08-10: Gongin**
Manningarfeløgini hitta Reiðarafelagið um, hvussu sáttmálin fyri fiskiskip kann nútímansgerast.

**02-09-10: Vinnuháskúlin**
Fundur í Maritima Útbúgvingarráðnum. Kunngerðir um sjóvinnuútbúgvingar eru til hoyringar.

**06-09-10: FSN**
Fyrireiking av rættarfundi um Nordic skipini. Umboð fyri mótpartin vóru við fyri at finna útav hvørji lønarkrøv eru goldin.

**06-09-10: FSN**
Blað nevndarfundur.

**06-09-10: FF**
Framhald av samrøðum við Reiðarafelagið um fiskiskipasáttmálarnar.

**07 til 09-09-10: Norðurlandahúsið**
Ráðstevna um pelagiska komplexi.

**07 til 09-09-10: Norrøna Ísland**
Annfinn Garðalíð var fyri FSN á fakfelagscruise. Vitja varð hjá einum íslendskum fakfelag. Nógv fakfeløg høvdu sent umboð til ferðina.

**10-09-10: Fiskimálaráðið**
Arbeiðsbólkur um inntøkutrygd.

**10-09-10: FF**
Fundur við Reiðarafelagið.

**13-09-10: MF**
Fundur við danskt reiðarí um innflagging í FAS.

**15. til 17-09-10: Lathi Finnland**
Eyðstein Djurhuus og Leif Joensen umboðaðu FSN á Norðurlendsku Navigatørkongressini. Tommy Petersen stjóri umboðaði Skipaeftirlitið. Nógv varð tosað um innflagging í FAS.

**20-09-10: Tor Shipping**
Fundur við Nolsø Shipping um sáttmála fyri filipinskar sjómenn.

**21-09-10: Jarðfeingið**
Nevndarfundur í Maritimum Forum, ásanna varð at vit ikki eru nóg virknir við tiltøkum,og í orðaskiftinum um sjóvinnu og shipping.

**22-09-10: Gongin**
Fundur um fiskiskipasáttmálan.

**24-09-10: Fiskimálaráðið**
Endaliga tilmæli um inntøkutrygd verður undirskriva og latið Jacob Vestergaard.

**24-09-10: Signabøður**
Vitjan fyri innboðin umborð á Athenu. Eyðstein, Ellintur, Leif og Annfinn vóru fyri FSN.

**27-09-10: FSN**
Nevndarfundur, avgjørt varð ikki at siga fiskiskipasáttmálan upp. Reiðarafelagið hevur síðan sagt upp.

**28-09-10: Sjó- og Vektarbúðin Tinganes**
Annika Olsen, Innlendismálaráðharri, vildi hitta vinnuna, um broytingar í útlendingakunngerðini.

30-09-10: Hotel Føroyar
Skeið í framløguteknikki.

**01-10-10: FSN**
Blaðnevndarfundur.

**01-10-10: Gongin**
Nú fiskiskipasáttmálin er uppsagdur hittust partarnir til at avtala samráðingartilgongdina. Vit hittast aftur 25-10-10, tá skulu sáttmálakrøvini leggjast fram.

**04-10-10: Alfred Petersen**
Jacob Vestergaard vil hitta manningarfeløgini nú tilmæli um inntøkutrygd er handað.

**05-10-10: FSN**
Nýsetti manningarstjórin hjá Fure Tank vitjar Faroese Maritime Union.

## Føðingardagar hjá limum okkara

| | | |
|---|---|---|
| Einar Hansen | 18. oktober | 70 ár |
| Josvein Hovgaard | 24. oktober | 70 ár |
| Elmar Guttesen | 25.oktober | 70 ár |
| Dánjal Klakk | 13. november | 70 ár |
| Eli Midjord | 15. november | 70 ár |
| Ólavur Nolsøe Olsen | 23. november | 70 ár |
| Petur á Roykheyggi | 14. desember | 70 ár |
| Hanus Lassen | 24. desember | 70 ár |
| Pauli Larsen | 28. desember | 70 ár |
| Jákup Kristiansen | 13. oktober | 60 ár |
| Ámundur Danielsen | 29. oktober | 60 ár |
| Niels Jacob Mortensen | 7. november | 60 ár |
| Poul Jacob Joensen | 12. november | 60 ár |
| Tummas J. á Løgmansbø | 13. november | 60 ár |
| Jógvan Olsen | 8. desember | 60 ár |
| Petur E. Olsen | 10. desember | 60 ár |
| Jacob Pauli Hammer | 19. desember | 60 ár |
| Marnar Danielsen | 21. desember | 60 ár |
| Bogi Josvein Benjardøgg | 6. november | 50 ár |
| Rógvi Højgaard | 6. november | 50 ár |
| Jonleif Holm | 6. november | 50 ár |
| John í Soylu | 11. november | 50 ár |
| Suni Johannesen | 11. november | 50 ár |
| Christian Eli Poulsen | 1. desember | 50 ár |
| Jan D. Jacobsen | 8. desember | 50 ár |
| Oskar Johansen | 8. desember | 50 ár |
| Sámal Peturl Olsen | 12. desember | 50 ár |
| Jákup Pauli Danielsen | 1. oktober | 40 ár |
| Virgar Fagraklett | 1. oktober | 40 ár |
| Hallur F. Bech | 2. oktober | 40 ár |
| Kristian Múller | 8. oktober | 40 ár |
| Øssur Hammer | 11. oktober | 40 ár |
| Petur Nolsøe | 12. oktober | 40 ár |
| Heri Niclassen | 20. oktober | 40 ár |
| Árni Krogh Dalsgaard | 6. november | 40 ár |
| Finnbjørn Poulsen | 11. november | 40 ár |
| Alfred Joensen | 7. desember | 40 ár |
| Jóhannes Vík | 22. desember | 40 ár |

# Samráðingar forút

Sáttmálin við lønardeildina fyri manningar hjá Strandferðsluni og Havstovuni gekk út 1.okt. Samráðingarnar byrja 13.okt, eitt mál sum óivað fer at merkja samráðingarnar er skipanin við niðursettari arbeiðstíð við staðbundnari avtalu.

FSN hevur ta greiðu meining, at niðurskurður í túratalinum, eigur ikki av sær sjálvum at lækka lønina hjá limum okkara. Útgangsstøðið má verða, at allir eru settir uppá fulla tíð.

Tað er ikki nakað dulsmál, at størru fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum eisini mugu hava atlit fyri vandanum fyri hópuppsøgnum hjá tí almenna. FSN hevur 50-60 limir í almennum starvi, og hesi størv kunnu illa niðurleggjast. So vit hava eitt heilt annað útgangsstøði, tá vit samráðast.

FSN hevur eisini sáttmála við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið fyri havnameistarar. Hesin sáttmálin skal eisini endurnýggjast í heyst.

Manningarfeløgini hava havt nakrar fundir við Reiðarafelagið um moderniseringar í fiskiskipasáttmálanum. Partarnir hava hvør í sínum lagi havt tankar um, hvussu ein dagføring kann gerast. Men illa hevur gingist, at fáa eina felags fatan av nakrari gongdari leið. Til tíðir hava fundirnir endað í hørðum orðadrátti. Nú hevur Reiðarafelagið sagt allar sáttmálarnar upp. Partarnir skulu leggja sáttmálakrøvini fram 25. okt. Sáttmálin hjá FSN gongur út við ársskifti.

Tað er umráðandi, at nevnd og leiðsla fáa góðan stuðul frá limunum, meðan samráðingar eru. Limir okkara eru, vælkomnir við góðum hugskotum. Samráðingar eru altíð torførar. Væntandi fara arbeiðsgevarar, at gera sær dælt av torføru støðuni í samfelagnum.

FSN ætlar ikki, at lata seg trýsta til stórar niðurskurðir, við hesum páskoti.



# 19 maskinistar prógv á Vinnuháskúlanum



*Páll Hansen:*

## Røða við próvhandan

Páll Hansen formaður í Maskinmeistarafelagnum

Tað er hátíðarhald her á skúlanum í dag, nú 19 nýggjar maskinistar hava fingið prógv handað.

Hjartaliga tillukku góðu prógvmóttakarar, tað altíð gleði at vera her á skúlanum, tá prógv verða handa.

Vit í Maskinmeistarafelagnum gleðast saman við tykkum og tykkara avvarðandi.

Men tað at verða maskinistur er samstundis ein lívslong læra, tíð er tað umráðandi, at tit halda áfram at menna og útbúgva tykkara, við millum annað at taka øll tey skeið, sum tit nú halda verða relevant fyri tykkum, og taki av øllum teimum skeiðstilboðum, sum tit fáa bjóða í framtíðini.

Tað mann fara at løna seg fleirfalt í framtíðini.

Sum maskinistar koma tit eisini at átaka tykkum uppgávur, sum arbeiðsleiðarar umborð á skipum, bæði handilsskipum og fiskiskipum.

Vit hava nú í nøkur ár haft eitt sera lágt tal av undantaksloyvum, ja tey hava kunna tals á hondini. Í seinastuni hevur talið av undantaksloyvum kortini verið spakuliga vaksandi aftur. Vit kenna ikki rættuliga orsøkina til hetta í løtuni, men fleiri av teimum skipunum sum flagga inn í løtuni, hava eina maskinorku millum 2000 og 3000 KW.

Og er tað okkara vón, at vit koma at síggja fleiri føroyskar maskinistar við hesum skipum.

Vit í Maskinmeistarafelagnum rokna við at síggja ein flokk av maskinistum árliga framyvir.

Eg farið at enda her við enn eina ferð at ynskja tykkum hjartaliga tillukku.



*19 maskinistar fingu handað prógv á Vinnuháskúlanum: Fremst frá vinstru: Høgni R. V. Niclasen, Leivur Jarnfoss, Virgar Zachariasen, Jan Ljósá, Regin Olsen, Helgi Suni Kristiansen, Bárður Poulsen, Jóannes Jespersen, Einar Dam, Leif Klein.*
*Rað 2 frá vinstru: Svend Magni Djurhuus, Dan Andreasen, Hilmar Sveinbjørnsson, Jan Hansen, Arnhold Rasmussen, Guttorm Eliassen, Tórolvur Samuelsen, Angus Winther Olsen,.*



*Fitt av fólki var komið saman á Vinnuháskúlanum fríggjadagin 3. september, tá 19 maskinistar fingu handað prógv. Til hátíðarhaldið flutti formaðurin í Maskinmeistarafelagnum, Páll Hansen, fram røðu.*

# Skeiðskema 2010

| Nr. | Skeiðnavn | Dagar | DKK | april | mai | juni | aug | sept | okt | nov | des |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ARPA skeið<br>ARPA Automatic Radar Plotting Aids | 4 | 8.900 | | 10 | | 23 | | | 15 | |
| 2 | GOC (Generelt certifikat sum radiooperatørur) Nýtt<br>GOC General Operator Certificate (NEW) | 15 | 14.900 | | | | | | | | |
| 3 | GOC-endurnýggjan<br>GOC General Operator Certificate, renewal of course | 7 | 7.000 | 26 | | | | | | 22 | |
| 4 | LRC (Avmarkað radioskeið)<br>LRC Long Range Certificate | 7 | 8.900 | | | | | | | | |
| 5 | LRC við Inmarsat<br>LRC Long Range Certificate, with Inmarsat | 8 | 9.950 | | | | | | | | |
| 6 | Tankers Safety serskeið fyri olju- gas- og kemikaliutangakip<br>Tankers Safety, special course for oil-, gas- and chemical tankers | 5 | 6.800 | | | | 16 | | | | |
| 7 | Flutningur av vandamiklum farmi<br>Transport of dangerous goods in dry cargo ships | 3 | 5.400 | 19 | | | | | | 08 | |
| 8 | Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra)<br>Supplementary training in medical proficiency | 4 | 7.500 | 24 | | | | 06 | | | |
| 9 | Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra)<br>um prógvið er eldri enn 10 ár<br>Supplementary training in medical proficiency<br>When certificate is older than 10 years | 10 | 12.000 | | | | | | | | |
| 10 | ECDIS (elektroniskt sjókort)<br>Course in Elektronic Cart Display Indication System | 4 | 8.900 | | 24 | | | 20 | 25 | | |
| 11 | Endurnýggjan av vinnubrævi<br>Renewal of maritime training certificate | pr. dag | 1.500 | 12 | | | | | | 01 | |
| 12 | SSO-skeið<br>Course for Ship Security Officers | 3 | 5.400 | | | | | 07 | | | |
| 13 | § 16-skeið<br>Working environment §16-course | 3 | 5.800 | | | | | | 18 | | |
| 14 | Ketilpassaraskeið<br>Skeiðið verður 5 fylgjandi fríggjadagar<br>Course as Bolier Tender | 5 | 7.500 | | | | | | 01 | | |
| 15 | Eldsløkking umborð á skipi<br>STCW A-VI/1-2<br>Fire Fighting on board Ships | 3 | 5.650 | 12<br>26 | 10<br>31 | 14 | 09 | | 04<br>18 | 01<br>15 | 06 |
| 16 | Endurtøku eldsløkking umborð á skipi<br>STCW A-VI/1-2<br>Refresher Course in Fire Fighting | 1 | 2.900 | 08<br>29 | | 03 | 05 | 09 | 07 | 04 | 09 |
| 17 | Sløkkileiðsla umborð á skipi<br>STCW A-VI/3<br>Advanced Fire fighting | 2 | 4.100 | | | | 19<br>26 | 02<br>16<br>26 30 | | | |
| 18 | Eldsløkking fyri skipsyvirmenn<br>Fire Fighting for Ships Officers | 5 | 9.750 | | 03 | | 16<br>23 30 | 13<br>20 27 | | | |
| 19 | STCW A-VI/1-2 & STCW A-VI/3<br>Sløkkiliðsfólk uttan sløkkibil<br>Advanced Fire fighting for Ships Officers | 5 | 8.650 | | | | | | | | |
| 20 | Sløkkiliðsfólk við sløkkibili | 10 | 17.300 | | | | | | 25 | | |
| 21 | Brunaumsjónarmenn | 7 | 12.100 | | | | | | | | |
| 22 | Venjing fyri sløkkilið | 1 | 1.800 | | | | | | | | |
| 23 | Eldsløkking og bjarging í tunlum | 3 | 7.000 | | | | | | | | |
| 24 | Grundleggjandi eldsløkking<br>(Fyri virkir, stovnar og einstaklingar) | 1 | 860 | | | | | | | | |

Vinnuháskúlin treytar sær rætt at avlýsa skeið, um ov fá eru tilmeldað.

Nóatún 7 · FO-100 Tórshavn
Tel 350 250 · Faks 350 251
info@vh.fo · www.vh.fo

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

KREA · TEL 60 80 80

# Navigatørurin í brennideplinum:

## Leif Joensen



**Útbúgving:** Eg var liðugur við skiparaútbúgvingina á sumri 1988, og tók eg hana á Klaksvíkar Sjómansskúla.

**Starv:** Tey síðstu 5 árini havi eg siglt hjá reiðarínum Sandgrevsti í Fuglafirði, sum skipari.

**Hjúnafelagi:** Maja Joensen, pedagoglesandi.

**Børn:** Bergfríð 19, Natalia 8, Pauli Maldrias 7 og Tóki 5

**Besta bók:** Hvør ið hevur verið tann besta bókin eg havið lisið, er ikki so einfalt at siga, allar eru tað til sína tíð, tað vil siga at áhugin fyri at lesa er sera broytiligur. Av tí at eg lesið til skipsførara relatera bøkurnar, ið eg nú lesið, til tað. Men so skal eisini sigast at tær bøkurnar, eru eisini sera spennandi og eru við til at geva mær vitan, ið er viðkomandi til mítt yrki.

**Fyrstu ferð til skips**
Í 1978 fór eg ein avloysaratúr fyri beiggja mín við Polarhav, tá var eg einans 14 ára gamal. Hettar var ein túrur sum av álvara hevur sett seg í minni á mær, orsøkin til tað er, at eg var ógvuliga ringur av sjóverki. Kokkurin royndi at gera sítt besta við at geva mær suppu og anna gott, men einki batti. Men tó so, eg gjørdist sjómaður hóast mín fyrsti túrur til skips, ikki var nakað at reypa av.

**Longsti túrur til skips:** Tann longsti túrurin eg havið verið til skips var við kanadiska rækjutrolaranum Aqviq, eg var stýrimaður. Tá túrurin var komin at enda, og vit lógu og lossaðu í Nuuk, bleyv eg spurdur um eg vildi gera ein eyka túr og tað játtaði eg. Hetta komst av at teir knappuliga manglaðu ein stýrimann. Orsakað av hesum bleiv túrurin alt í alt um 4. Mðr heimanifrá. Síðani tá hevur tað verið so, at eg havið verið burtur ca. 6 – 8 vikur í senn.

**Hvørjum skipum hevur tú verðið við:** Sum longu nevnt so var tað fyrsta skipið eg var við Polarhav, síðani Leivur Øssurson, sum var eitt skittfiskaskip, eftir tað fór eg við Havlot. Eitt stutt tíðarskeið var eg uppi á landi og arbeiddi, og var tað á trol- og nótavirkinum Vónini, hettar fyri at nema mær kunnleika til trolarbeiði. Eftir at hava verið uppi á landið, var farið aftur á sjógvin, nú var farið við Snodda. Við Snodda var fyri tað mesta roynt vestan fyri Mykines eftir kongafiski. Í 1988 bleiv eg stýrimaður við Nesbúgvanum, har var eg einans nakrar fáa túrar, tí eg fekk bjóða kjans í Kanada og valdi at royna tað. Byrjaði sum trolbassur og síðan stýrimaður við Aqviq, sum var ein rækjutrolari . Síðani skipari við Kinguq, sum var systirskip til Aqviq, og var eg har frá 1994 til og við 1999. Valdi síðan at fara sum stýrimaður við Acadian Gale, sum eisini var ein rækjutrolari. Hann var væl størri enn Kinguq, útgjørdur at toga tvey trol og helt eg at tað var áhugavert at fáa mær royndir tí viðvíkjandi. Síðan gekk leiðin aftur til Føroya har eg var stýrimaður og skipari við Sandfrakt. Tá reiðaríið keypti eitt skip afturat í 2005, bleiv eg ein av skiparanum har.

**Størsta avbjóðingin hjá einum skipara í dag:** Sum útviklingurin hevur veri tey seinastu árini, veksur pappírsveldi umborð á skipunum við risaferð. Aftrurat tí at skula kanna certificatir hjá manning og skipi, veksur tað við ørðum pappírum sum skulu útfyllast. Her hugsi eg um ISM, ISPS o.s.v. So núverandi og framtíðarskiparar skulu hava tunguna mitt í munninum, tá teir skulu navigera millum sker og skjøl.

**Frítíðarítriv:** Eg slappi av tá eg gangi mær ein túr inn í Dalar. Annars dámar mær eisini væl at skrúva og smíða.

**Bilur:** Kia carnival

**Telda:** Dell

**Besti sangur:** Tónleikur er nakað eg eri uppvaksin við. Pápi mín spældi nógv orgul og var organistur i Fuglafjarðar kirkju. Tá eg var um 11 ára gamal fór eg í Fuglafjarðar hornorkestur og var eg har alt í alt um leið 8-10 ár. Mín tónleika áhugi spennir rættiliga víða, frá horntónleiki, gospel, contry og ikki at gloyma ein góðan við mammubeiggja Niels Midjord.

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum:** Fyrst og fremst at tað gongst mínum nærmastu væl, allar smáar og stórar hendingar saman við konu og børnunum. Tað at kunna geva øðrum eitt herðaklapp og síggja, hvat tað kann gera við tann einstaka.

**Hvat kann øsa teg:** Órligheit. Tá fólk eru so yvrig eftir at siga sína meining, at tey sára onnur meir enn neyðugt. Annars haldi eg, at vit føroyingar duga alt ov illa at diskutera og lurta eftir hvørjum øðrum. Hetta førir ofta til øði og baktalilsi, ístaðin fyri eina loysn á trupulleikunum.

# Á fakfelagsskeið við Norrønu

*Annfinn Garðalíð*



Smyril Line skipaði fyri "fakfelagscruise" til Íslands við Norrønu frá 6. til 9. september.

Við í ferðalagnum vóru 20 luttakarar, sum umboðaðu ymiskar partar á føroyska arbeiðsmarknaðinum, kann t.d. nevna Jóannes Samuelsem, Páll Vík og Kára Sigursheim frá Maskinmeistarafelagnum og Annfinn Garðalíð frá Føroya Skipara og Navigatørfelag. Umboð vóru eisini frá S & K, Allmanna- og Heilsuhjálparafelagum, Felagið føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar, Felagið Miðlafólk og Fyrisitingarumboð fyri handverkarar.

Undirvísari var Páll Nielsen advokatur, skeiðleiðarar vóru Jarvin Feilberg og Jákup Páll Mohr Mortensen.

Evni, sum vit blivu undirvíst í vóru m.a. hesi: Álitisfólkaskipan, starvsfólkarættur, starvsmannalógin, løgtingslóg um fyrisiting/forvaltning.



## Álitisfólkaskipan

Fyrsta dagin var álitisfólkaskipan á skránni.

Tá vóru m.a. hesir spurningar greiddir: Hvat er eitt álitisfólk, uppgávan hjá einum álitisfólki og hví vit hava álitisfólk ?

## 7. september

Fyrrapartin var evni "At tora at traðka fram" og seinnapartin fingu vit vitjan av Jóhann Sveinbjørnsson nevndarlimi í íslendska fakfelagnum FOSA "Felag opinberra starfsmanna á Austurlandi".

Hetta felag er limur í "paraplyfelagnum" BSRB, sum hevur 32 feløg undir sær. Jóhann greiddi frá, hvussu stjórnin hevði "trælabundið" teir við ikki at kunna fara í verkfall. Men í 1977 kom broyting í. Í 1977 og 1984 vóru rættuliga stór verkføll í Íslandi, og tey løgdu so gott sum alt samfelagið lamið. Men verkfallið vardi bert nakrar dagar, so reyk íslendska stjórnin. Í Íslandi kanst tú arbeiða til 70 ára aldur hjá tí almenna, og lønin er tá millum 1.000-1.200 ís. kr. um tíman. Skatturin av teimum fyrstu 200.000,- kr. er 37,2% og 40,12% av tí sum er omanfyri.

Jóhann Sveinbjørnsson, vildi mæla okkum til at stovna eitt sonevnt "paraplyfelag". Tað hevði styrkt fakfeløgini, tá ið á stendur.

## Útferð

Seinni um dagin varð farið útferð við bussi til kraftverkið í Fljótsdali. Hetta kraftverkið bleiv bygt til aluminiumsframleiðslu á Reyðafyrði.

Sjálvt kraftverkið er góðar 1.000 metur inni í fjallinum, og eitt ótal av kilometrum av tunlum eru boraðir til vatnleiðingar til verki. Íslendingar innfluttu 1.800 útlendingar til arbeiðið, og høvdu teir somu sømdir sum Íslendingar yvirhøvur.



## Faroese Maritime Unions stovnað

Tann 2. juli varð undirskrivað ein avtala um samstarv millum føroysku sjómannafeløgini. Nýggi felagsskapurin hevur fingið navnið **Faroese Maritime Unions, stytt FMU.**

Endamálið við hesum tiltaki er at fáa í lag skipaði sáttmálaviðurskifti fyri útlendsk sjófólk, ið sigla við skipum í Føroysku Altjóða Skipaskránni. FMU skal eisini umboða hesi sjófólk mótvegis reiðarum, viðkomandi myndugleikum og í millumlanda fakfelagssamstarvi.

Hvørt felag velur eitt umboð í nevndina og í fyrstu nevndini í FMU sita Eyðstein Djurhuus, Jan Højgaard og Páll Hansen.

## 3. dagin

Triðja dagin varð undirvíst í Arbeiðsmarknaðarlóg v/ Páll Nielsen. Síðani var útferð aftur við bussi til Reyðafjørð. Har vitjaðu vit triðstørsta fakfelagið AFL í Íslandi. Hetta fakfelagið umboðar millum annað fiskivinnuna umframt nógv onnur fakfeløg. Tey greiddu m.a. frá pensjónsskipanini har arbeiðstakarin rindar 4% og arbeiðsgevarin 8% og íslendski staturin veitir so eina grundupphædd í pensjón.

Í Íslandi fóru tey undir pensjónsviðurskiftini í 1970, so tað má sigast, at íslendingar hava verið skjótir á veg við pensjónsviðurskiftunum.

Eg má siga fyri mítt viðkomandi, at hesin túrurin var sera upplýsandi og gevandi, men sjálvsagt er ikki rúm fyri øllum lógum og paragraffir, men vit fingu eitt gott innlit í Álitisfólkaskipanina, starvsfólkarætt, starvsmannalógina og fyrisitingarlógina.






# Nýggj avsláttarskipan

**Nú fært tú avsláttur av inngjaldinum til Tryggingarfelagið Føroyar, um tú hevur tvær ella fleiri privatar tryggingar hjá okkum. Fleiri tryggingar tú hevur, størri avsláttur fært tú.**

Bil-, innbúgvs-, sethúsa- og vanlukkutryggingar kunnu verða við til at geva tær avsláttur upp til 15%. Hevur tú harafturat inngjald til Betri pensjón, kanst tú fáa heilt upp til 32% avsláttur. Avsláttarin verður latin av tínum inngjaldi til Tryggingarfelagið Føroyar.

↘ **Les meira um tín avsláttur á trygging.fo**

↘ 2 tryggingar = **3%** avsláttur ↘ 3 tryggingar = **8%** avsláttur ↘ 4 tryggingar = **12%** avsláttur
↘ 5 ella fleiri = **15%** avsláttur ↘ 5 ella fleiri + Betri pensjón = **32%** avsláttur

Tað eru bara privatar bil-, innbúgvs-, sethúsa- og vanlukkutryggingar, ið eru avsláttargevandi, tá umræður at fáa upp til 15% avsláttur av inngjaldinum til Tryggingarfelagið Føroyar. Bil- og sethúsatryggingar kunnu telja við fleiri ferðir í skipanini (um tú hevur fleiri tílíkar tryggingar), meðan innbúgvs- og vanlukkutrygging bert telja við eina ferð hvør. Avslátturin verður tó latin av samlaða inngjaldinum til allar privatar skaðatryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum. Ert tú harumframt "Ú-kundi", fært tú 20% avsláttur oman á tey fyrstu 15% av inngjaldinum til Tryggingarfelagið Føroyar. Ein "Ú-kundi" rindar í minsta lagi 18.000 kr. í árligum inngjaldi til Betri pensjón (www.u-dagur.fo). Av tí, at talan er um 20% av eini upphædd har 15% longu eru tikin av frammanundan, verður endaligi avslátturin tó í mesta lagi 32%. Avsláttarskipanin kemur í gildi 1. mai 2010.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón